

# VINNA *og* VØKSTUR, VITAN *og* VÆLFERÐ

**Vinnupolitikkur** fyri Tórshavnar kommunu

**2024 – 2028**

torshavn.fo


**Vinna og vøkstur, vitan og vælferð**

*– Vinnupolitikkur fyri Tórshavnar kommunu*

**ÚTGEVARI:** Tórshavnar kommuna 2024 ©

**UMBRÓTING:** Føroyaprent


Beini
–fá ørðið upp

# VINNA og VØKSTUR, VITAN og VÆLFERÐ



**Vinnupolitikkur** fyri Tórshavnar kommunu

**2024 – 2028**

# Innihald


1 Inngangur . . . 7
2 Arbeiðssetningur . . . 9
3 Arbeiðsháttur . . . 12
4 Átøkini . . . 14
5 Hvat er vinnupolitikkur? . . . 15
6 Lógargrundarlag um kommunur og karmar hjá vinnulívinum . . . 17
7 Fólkatalið í Tórshavnar kommunu . . . 20
8 Arbeiðsmegi . . . 24
9 Bústaðarviðurskifti . . . 25
10 Grønur politikkur – kommunalur og vinnuligur . . . 30
11 Grannalív og vinnulív . . . 37
12 Vinnulív í Tórshavnar kommunu . . . 42
13 Slag av virksemi . . . 50
14 Gongdin við útbúgving hjá føroyingum . . . 54
15 Samferðsluviðurskifti í Tórshavnar kommunu . . . 62
16 Nýggjar vinnur . . . 67
17 Vinnustykkir . . . 71
18 Ein nýggjur vinnupolitikkur fyri Tórshavnar kommunu . . . 72
19 Átøk . . . 74
19.1 Átak – samstarv millum kommununa og vinnuna . . . 76
19.2 Átak – vinnan nú og í framtíðini . . . 80
19.3 Átak – samferðsla og ferðsluviðurskifti . . . 89
19.4 Havnin – lærlinga- og lestrarbýur . . . 94
19.5 Átak – grøn kommuna, grøn vinna . . . 99
19.6 Átak – bústaðarpolitikkur og vinnupolitikkur . . . 106
19. 7 Átak – integratión . . . 109
20 Kostnaður fyri at seta átøkini í verk, meting av ábyrgdarbýtinum, tíðarætlan fyri átøkini . . . 111



# 1 Inngangur

**Tað skal vera gott** at reka vinnulív í Tórshavnar kommunu, og vinnulívið í Tórshavnar kommunu skal hava so góðar karmar at virka undir, sum til ber.

Samstundis sum verandi vinnulív skal kunna menna seg, er umráðandi, at eisini nýggjar fyritøkur og vinnur staðseta seg í kommununi. Tað er endamálið við nýggja vinnupolitikkinum hjá Tórshavnar kommunu.

Tí hava Vinnunevndin og Fíggjarnevndin hjá Tórshavnar kommunu tikið stig til arbeiðið at orða ein vinnupolitikk fyri kommununa.

12. januar 2023 samtykti Vinnunevndin, at ein vinnupolitikkur skuldi orðast, og 18. januar 2023 samtykti Fíggjarnevndin málið. Vinnunevndin skrivar soleiðis í fundarsamtyktini:

„Tað er ikki uppgávan hjá kommununi at reka vinnulív. Tað ger privata vinnan.

Uppgávan hjá kommununi er heldur at skapa hóskandi karmar soleiðis, at vinnan og vinnuliga virksemið kunna virka, mennast og vaksa.“ [1]

Politiski viljin er, at tað alla tíð eigur at verða arbeitt við góðum og fjølbroyttum karmum fyri vinnulívið, og at arbeiðast skal eisini fyri at menna vinnulívið og geva nýggjum fyritøkum og vinnum góðar karmar.

Har vinnan trívist, eigur fólkið eisini at trívast. Tí leggur politikkurin seg eftir, at vinnan og fólk trívast saman. Tí má havast í huga, at átøk og annað, ið verða sett í verk, bæði gagna vinnulívi, grannalívi og umhvørvi.

Við støði í politisku samtyktini leggur hetta álitið lunnar undir vinnupolitikkin hjá Tórshavnar kommunu 2024 – 2028.

Vinnupolitikkurin hevur sjey høvuðsevni við átøkum. Nøkur átøk kunnu setast í verk ta tíð, ið hesin vinnupolitikkurin fevnir um, tí onnur átøk taka longri tíð. Onkur átøk eru løtt at seta í verk, og onnur átøk krevja meira – bæði fíggjarliga og tá tað ræður um tíð. Átøkini venda sær til Tórshavnar kommunu, til landið og til vinnuna.

Umframt hetta álitið er ein bóklingur, ið verður givin út fyri seg og tekur samanum við átøkum, ið fylgibólkurin mælir til.

1 Fundarsamtykt hjá Vinnunevndini.



# 2 Arbeiðssetningur

**Fyrstu stig í arbeiðinum** at orða vinnupolitikk vórðu tikin í januar 2023, tá Vinnunevndin og Fíggjarnevndin hjá Tórshavnar býráð samtyktu, at ein vinnupolitikkur skuldi orðast.

Í apríl varð samskipari settur, og eisini varð ein fylgibólkur settur. Fyrsti fundur hjá teimum var 27. apríl.

Arbeiðsbólkurin skal lýsa verandi karmar hjá vinnuni í Tórshavnar kommunu og orða nýggjan vinnupolitikk.

Í samtyktini frá Vinnunevndini og Fíggjarnevndini stendur:

„Uppskotið til vinnupolitikk skal leggja dent á, hvussu kommunan best kann skapa karmar fyri, at vinnulívið kann virka, mennast og vaksa.

Uppskotið skal gera greitt, hvør uppgávan er hjá ávikavist kommununi og vinnuni í strembanini eftir at skapa eitt gott fjølbroytt og burðardygt vinnulív í høvuðsstaðnum.

Lýsingin og tilmælini skulu vera grundað á viðkomandi hagtøl, kanningar og frágreiðingar. Gjøgnum samskifti við vinnulív, handilsfeløg, áhugabólkar og onnur skal arbeiðsbólkurin tryggja, at sjónarmiðini hjá ymsu pørtunum verða viðgjørd í arbeiðinum at orða vinnupolitikkin.

Uppgávan er eisini at koma við einari tíðarætlan fyri íverksetan av tilmælunum, meting av ábyrgdarbýtinum og kostnaðarmeting av átøkunum." [2]

Álitið um vinnupolitikk fer at vísa á, hvussu vinnan fær bestu karmar at virka undir, hvussu vinnan og borgarar kunnu virka lið um lið, hvussu vinnan og kommunan saman kunnu tryggja og verja náttúru og umhvørvi til gagns fyri bæði vinnu og borgarar.

Álitið fer at vísa á, hvør uppgávan hjá kommununi er, hvør uppgávan hjá landinum er, og hvør uppgávan hjá vinnuni er fyri at røkka málinum um eitt gott og burðardygt vinnulív.

Í álitinum verður eisini komið við tilmælum um átøk, tíðarætlan fyri nær hesi eiga at verða sett í verk og kostnaðarmeting av átøkunum.

2 Yvirlit yvir vinnulívið í Tórshavnar kommunu (samtykt hjá Vinnunevndini og Fíggjarnevndini)



## Arbeiðsbólkur

**Marita Rasmussen,** stjóri, Havstovan

**Bárður Michelsen,** Tórshavnar Havn

**Sóley Heradóttir Hammer,** leiðari, Hugskotið

**Beinta Løwe,** verkætlanarfólk

## Spurningar, ið m.a. verða viðgjørdir, eru:

- Hvussu eru karmarnir at reka vinnulív í Tórshavnar kommunu?
- Hvat eru góðir karmar fyri vinnuna?
- Hvørjar tænastur eru umráðandi, at ein kommuna hevur at bjóða vinnulívinum?
- Hvussu gongur við grønum politikki?
- Hvat skal kommunan gera komandi 4-5 árini, um tað framhaldandi skal vera nógv vinnuligt virksemi í kommununi?
- Hvat skal gerast komandi árini, um nýggjar vinnur og fyritøkur skulu staðseta seg í Tórshavnar kommunu?

# 3 Arbeiðsháttur

**Tilmælini í vinnupolitikkinum fyri Tórshavnar kommunu hava m.a. støði í hesum:**

- **Samrøður við vinnulív, áhugabólkar, feløg v.m., ið fáast við vinnulív. Samrøður við tey, ið onkursvegna verða ávirkað av vinnulívinum. Samrøður við kommununa og stovnar, ið hava tænastur og/ella samband við vinnulívið.**
- **Fundir við staðbundnu nevndirnar í Tórshavnar kommunu fyri at hoyra teirra sjónarmið um vinnulív í økjunum uttan um Havnina.**
- **Vinnupolitikkur hjá norskum, íslendskum og donskum kommunum.**
- **Hugsanin hjá Vinnuhúsinum um vinnupolitikk. Áskoðanin hjá útlendskum felagsskapum um kommunalan vinnupolitikk, t.d. Dansk Industri, Næringslivets Hovedorganisasjon.**
- **Hagtøl frá Hagstovu Føroya, Yrkisdeplinum, Skráseting Føroya, Tórshavnar kommunu.**
- **Vinnuforum 2023**
- **Grøna Leiðin (Umhvørvispolitikkur hjá Tórshavnar kommunu 2016)**
- **Umhvørvispolitikkurin hjá Brennistøðini**
- **Ferðavinnupolitikkurin hjá Tórshavnar kommunu (2022)**
- **Bústaðarpolitikkurin hjá Tórshavnar kommunu (2018)**
- **Parkeringspolitikkurin hjá Tórshavnar kommunu (2015)**
- **Visjón og virðisgrundarlag hjá Tórshavnar kommunu (2010)**
- **Kommunuætlan Tórshavnar kommuna (2020)**
- **Umframt aðrar keldur**

Í sambandi við arbeiðið at orða ein vinnupolitikk er miðað ímóti at fáa eina so breiða umboðan í vinnulívinum, sum gjørligt, bæði tá tað ræður um vinnur, men eisini stødd av fyritøkum.

Eisini er dentur lagdur á, at bæði størri og smærru plássini í kommununi eru umboðaði, umframt at hugt hevur verið eftir staðseting, soleiðis at ymsu ídnaðarøkini í kommununi eisini eru umboðaði.

Av tí at ein ferðavinnupolitikkur varð gjørdur í fjør, eru fyritøkur innan ferðavinnuna ikki tiknar so nógv við í hesum álitinum, tí mett varð, at tær fyritøkurnar eru væl umboðaðar í álitinum um ferðavinnupolitikk. Kortini eru onkrar fyritøkur, ið arbeiða innan ferðavinnuna við.

# 4 Átøkini

**Út frá tí,** ið er komið fram í samrøðum, hagtølum, frágreiðingum og øðrum, hevur arbeiðsbólkurin valt nøkur átøk, ið eiga at verða sett í verk komandi árini fyri at bøta um karmarnar at reka vinnulív í Tórshavnar kommunu.

Summi átøk kann kommunan seta í verk, onnur átøk eru ábyrgdarøkir hjá landinum, meðan vinnan sjálv eigur ábyrgd av onkrum av átøkunum. Kostnaðarmetingar eru settar við summi av átøkunum, men talan er um metingar og ikki endaligan kostnað. Harumframt eru tíðarmetingar eisini settar við onkur av átøkunum.

Summi átøk kunnu gerast beinanvegin, og onnur átøk taka longri tíð.



# 5 Hvat er vinnupolitikkur?

**Vinnuhúsið** skrivar soleiðis um, hvussu Føroya Arbeiðsgevarafelag sær vinnupolitikk:

„Vinnupolitikkur snýr seg um tær treytir og teir karmar, sum politiska skipanin letur vinnuna virka innanfyri. Tað ber tí illa til at geva eina einfalda allýsing av vinnupolitikki. Vinnupolitikkurin er eitt úrslit av politiskum avgerðum av ymsum slag á ymsum økjum, ið samanlagt skapa vinnuliga umhvørvið hjá vinnuni. Gagnligur vinnupolitikkur snýr seg um at skipa umstøðurnar soleiðis, at vinnan framleiðir størst møguligt virði fyri samfelagið.“[3]

Tá tað ræður um kommunalan vinnupolitikk, sigur Dansk Industri m.a. soleiðis: „En serviceorienteret forvaltning og en visionær erhvervspolitik er vigtige forhold for at en kommune er attraktiv for virksomhederne.“ [4]

Næringslivets Hovedorganisasjon (NHO) í Noregi skrivar soleiðis um

3 Industry
4 Den attraktive erhvervskommune – DI (danskindustri.dk)

leiklutin hjá kommunum og tí almenna, tá tað ræður um vinnulívspolitikk: „Næringslivet møter offentlig sektor i mange ulike sammenhenger og roller. Stat, fylkesksommuner og kommuner er viktige premissgivere for vekst og utvikling i næringslivet, gjennom den forvaltning og myndighetsutøvelse som utøves.“ [5]

Sostatt eru kommunur og landið ein umráðandi partur av menningini og vøkstrinum í vinnulívinum. Tí er eisini umráðandi við einum framskygdum kommunalum vinnupolitikki.

5 Offentlig sektor for bedriftene (nho.no)



# 6 Lógargrundarlag um kommunur og karmar hjá vinnulívinum

**Kommunustýrislógin** hevur hesar ásetingar um kommunur og vinnuligt virksemi:

> § 50. Ein kommuna kann einans taka lut í vinnuligum virksemi, um so er, at virksemið tænir einum almannagagnligum endamáli og ikki hevur vinning fyri eyga.
>
> *Stk. 2.* Kommunan kann seta almenn tiltøk í verk, um so er, at hetta er til frama fyri vinnulívið á staðnum, men stuðul til einstaklingar ella einstakt virksemi má ikki latast uttan so, at serligar orsøkir eru.
>
> *Stk. 3.* Áðrenn tiltak sambært stk. 1 ella stk. 2 verður sett í verk, skal kommunustýrið skrivliga boða landsstýrismanninum frá hesum.[6]

6 Lógasavn (logir.fo)

Sostatt setur grein 50 greið mørk fyri vinnuvirksemi og kommunalum virksemi.

Umframt kommunustýrislógina er eisini kommunufulltrúin, ið loyvir kommunum at taka ávísar avgerðir, ið gagna borgarum í kommununi. Hetta er t.d. at betra um karmar hjá vinnulívinum við t.d. infrastrukturi og øðrum.

Íverksetarahús, ið fleiri kommunur hava, eru skipaði við heimild í kommunufulltrúini.

Í Tórshavnar kommunu er íverksetarahúsið Hugskotið, sum varð sett á stovn í 2014. Endamálið við Hugskotinum er at stimbra menningina av einum fjøltáttaðum vinnulívi í kommununi við at veita íverksetarum góðar karmar.

Samanbera vit við Danmark, so hava danskar kommunur ávísar heimildir, ið beinleiðis lata upp fyri at bøta um viðurskiftini hjá vinnulívi í kommununum við Lov om erhvervsfremme: „§ 14. Kommunerne kan efter denne lov varetage lokale erhvervsfremmeaktiviteter, der omfatter erhvervsservice og erhvervsudvikling.“ [7]

Tá tað ræður um eftirlit við vinnulívinum viðvíkjandi dálking, óruddi, óljóði og øðrum eru partar av eftirlitinum hjá landinum, og partar av eftirlitinum eru hjá kommununum.

7 L 73 – 2018-19 (1. samling) (som vedtaget): Forslag til lov om erhvervsfremme. / Folketinget (ft.dk)



Landið (Umhvørvisstovan) hevur eftirlit við serliga dálkandi virksemi. Kommunan hevur eftirlit við virksemi, sum ikki er „serliga dálkandi virksemi“. [8]

Í ávísum førum hava kommunurnar eisini sjálvar ásett reglugerðir. Kommunufelagið hevur t.d sjálvt ásett reglugerð um óljóð frá skipum: „Sambært reglugerðini skulu skip ikki sleppa í føroyska havn, um tey bróta markvirðini og ikki innan í mesta lagi 6 mánaðir megna at fáa viðurskiftini í rættlag.“ [9]

8 Eftirlit (us.fo)
9 Kommunufelagið samtykt nýggjar reglur um óljóð (kf.fo)

# 7 Fólkatalið í Tórshavnar kommunu

**Vinna og vælferð** eru heft saman, tí inntøkur frá vinnuni og skattainntøkur hjá starvsfólkum í vinnuni fíggja vælferðina í kommununi. Men vælferðartænastur, sum kommunan veitir, eitt nú dagstovnar, eldrarøkt og annað eru eisini fyritreyt fyri, at vinnan fær starvsfólk, og at fólk vilja búgva í kommununi. Tí eigur ein kommunalur vinnupolitikkur at taka atlit til trivnað hjá bæði vinnulívi og borgarum. Og saman eiga vinna og kommuna at tryggja, at fólk støðast í kommununi.

Tórshavnar kommuna fevnir um Kollafjørð, Signabø, Oyrareingir, Kaldbaksbotn, Kaldbak, Sund, Hvítanes, Norðradal, Syðradal, Hest, Koltur, Velbastað, Kirkjubø, Nólsoy, Argir, Hoyvík og Havnina.

Í flestu av bygdunum og býnum er okkurt slag av virksemi, landbúnaður, ídnaður, handverk, handilsvirksemi o.s.fr.

Tórshavnar kommuna er størsta kommuna í Føroyum, og tann kommunan, sum veksur mest. Í mai 2023 búðu tilsamans 23.315 fólk í Tórshavnar kommunu.[10]

Men hóast hetta, so er ikki vøkstur í øllum pørtum av kommununi. Tí meðan fólkatalið øktist í Havn, á Argjum og í Hoyvík, so minkaði fólkatalið í fleiri av smærri bygdunum í kommununi.[11]

Ein kommunalur vinnupolitikkur eigur tí eisini at hava fyrilit fyri, at fólkavøkstur og trivnaður eru í øllum bygdum og býum í Tórshavnar kommunu.

Tølini vísa, at ungfólk í 20'unum flyta úr kommununi, men tey koma aftur, tá tey eru í 30'unum. Orsøkin er allarhelst, at tey tá hava verið uttanlands og fingið sær útbúgving. Men tølini vísa eisini, at í aldursbólkunum oman fyri 35, er fólkatalið lægri enn tað er hjá teimum millum 30 og 34. Hví so er, er ilt at siga. Hinvegin veksur talið aftur í bólkinum millum 55 og 59. Heldur ikki her ber til at siga, hví so er.

10 Hagstova Føroya juni 2023
11 54.300 fólk búðu í Føroyum 1. mars – vøksturin er 1, 1% | Hagstova Føroya

**Aldurssamansetingin í Tórshavnar kommunu:**

| Aldur: | Tils. | Aldur: | Tils. |
|---|---|---|---|
| 00-04 | 1562 | 50-54 | 1411 |
| 05-09 | 1588 | 55-59 | 1645 |
| 10-14 | 1585 | 60-64 | 1310 |
| 15-19 | 1607 | 65-69 | 1093 |
| 20-24 | 1311 | 70-74 | 1039 |
| 25-29 | 1251 | 75-79 | 783 |
| 30-34 | 1650 | 80-84 | 496 |
| 35-39 | 1378 | 85-89 | 275 |
| 40-44 | 1453 | 90-94 | 143 |
| 45-49 | 1438 | 95-99 | 47 |

**VIÐMERKING:** *Tølini fevna um allar borgarar í Tórshavnar kommunu.*

Fólkatalið er fyritreyt fyri, at til ber at fáa arbeiðsmegi og lærlingar, sum búgva í kommununi.



Útbyggingin av vegakervinum, t.d. Eysturoyartunnilin, hevur knýtt Suðurstreym, Eysturoynna og Norðoyggjar nærri at hvørjum øðrum, og tí er eisini lættari hjá fólki og vinnu at flyta millum økini. Sostatt økist kappingin millum kommunurnar um at draga vinnulív og íbúgvar til sín.

Tølini hjá Hagstovuni vísa eisini, at fólkavøkstur er í øllum kommunum rundan um Skálafjørðin. Ein orsøk til hetta er uttan iva Eysturoyartunnilin, sum læt upp í 2020.

Í desember 2023 læt Sandoyartunnilin upp, og tí er mobiliteturin hjá vinnu og starvsfólkum uppaftur størri.

# 8 Arbeiðsmegi

**Fyritreytin fyri,** at vinnan kann mennast, er, at arbeiðsmegi er tøk. Føroyar hava hægsta vinnutíttleika í Evropa. T.v.s. at nógv fólk eru á arbeiðsmarknaðinum. Í 2022 var vinnutíttleikin 84,9 prosent, tí 32.855 fólk vóru á arbeiðsmarknaðinum.[12] Arbeiðstíttleikin í Suðurstreymoy er eisini høgur, 86,3 prosent. Hagstovan ger í løtuni nýggja kanning av arbeiðstíttleikanum í Føroyum.

Men fyri at vinnan kann fáa arbeiðsmegi, eru onnur viðurskifti, ið gera seg galdandi, tað er t.d. útbúgving, bústaður, dagstovnar, eldrarøkt, v.m.

12 Kanning: Eru vit framvegis líka virkin á arbeiðsmarknaðinum? | Hagstova Føroya



# 9 Bústaðarviðurskifti

**Bústaðarpolitikkur** er umráðandi partur av einum kommunalum vinnupolitikki. At fólk fáa bústað er, umráðandi fyri at vinnan fær starvsfólk og kommunan fær skattgjaldarar. Tí er bústaðarpolitikkur partur av vinnupolitikki.

Í 2018 samtykti Tórshavnar býráð ein bústaðarpolitikk fyri Tórshavnar kommunu: „Málið er áseta og tryggja, at bústaðarmøguleikarnir í kommununi eru nøktandi..." [13]

Tórshavnar kommuna veksur skjótt, og sethúsaprísirnir eru nógv hækkaðir. Annan ársfjórðing 2023 var miðalprísurin á einum miðalsethúsum í Havn 3,9 milliónir krónur. Bústaðarbyrðan í Havnini er 43 prosent, samanborið við 27 prosent í meðal fyri allar Føroyar.[14] Bústaðarbyrðan er parturin av tøku inntøkuni, sum eitt par við tveimum børnum undir sjey ár brúkar til bústaðarlán.

13 Bústaðarpolitikkur Tórshavnar kommuna
14 betri.fo/fo/tidindi/2023/august/sethusaprisir-og-byrda

Men hóast hækkandi prísir, so veksur talið av húskjum í kommununi. Húski eru fólk, ið hava sama skrásetta bústað í landsfólkaskránni:

**Húski í Tórshavnar kommunu**

| Ár | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 |
|---|---|---|---|---|---|
| | 7370 | 7616 | 7805 | 8036 | 8182[15] |

Sum tølini vísa, so eru oman fyri 800 fleiri húski í Tórshavnar kommunu enn fyri fimm árum síðani. Leggjast kann afturat, at talið av húskjum í Føroyum tilsamans er oman fyri 19.100, sum er tað mesta nakrantíð.[16]

Tórshavnar kommuna hevur nøkur tøk grundstykkir. Í løtuni eru grundstykkir til sølu í Nólsoy. Í 2024 verður ætlaða útstykkingin av 46 grundstykkjum á Argjum liðug, og eisini verður arbeitt við einari útstykking við 14 grundstykkjum á Velbastað, um áhugi vísir seg at vera fyri hesum.[17]

Síðani 2016 hevur býráðið samtykt útstykkingar og íbúðabyggingar, ið tilsamans geva uml. 1300 bústaðir sum til dømis tvíhús, raðhús og íbúðir. Allar verkætlanirnar eru kortini ikki lidnar enn, og tí er torført

15 Hagstova Føroya 2023
16 Met nógv húski í Føroyum | Kringvarp Føroya (kvf.fo)
17 Kommunalar útstykkingar í Tórshavnar kommunu – Tórshavnar kommuna (torshavn.fo)



neyvt at siga, hvussu nógvir bústaðir eru komnir afturat í Tórshavnar kommunu seinastu árini.

Harafturat eru sethús og tvíhús í eldri útstykkingum enn 2016 og íbúðabyggingar á Karlamagnusarbreyt, har tað í alt eru uml. 370 íbúðir.

Umframt tað verður arbeitt við verkætlanum, sum geva uml. 1.400 bústaðir afturat.[18]

## Dagstovnapláss og eldrapláss

Dagstovnapláss, eldrarøkt og annað eru tænastur, ið ein kommuna má veita, um fólk skulu sleppa til arbeiðis.

| Ár | Barnagarður | Vøggustova |
|---|---|---|
| 2020 | 1194 | 679 |
| 2021 | 1206 | 600 |
| 2022 | 1234 | 618 |
| 2023 | 1209 | 603 |
| 2024 | 1215 | 595 |

18 Kelda: Tórshavnar kommuna

Sum tað sæst á tølunum, so er talið av vøggustovuplássum minkað seinastu fimm árini, meðan talið av barnagarðsplássum er vaksið. Orsøkin er, at fleiri stovnar hava minkað talið av vøggustovubørnum, ið tey taka inn, tí tað av tí sama vórðu ov nógv børn innskrivaði í barnagarðin. Sostatt megnaðu dagstovnarnir ikki at taka ímóti børnunum, sum komu úr vøggustovu. Børn eru í vøggustovu í tvey ár, og í barnagarði í fýra ár. Tað merkir, at talið av børnum í vøggustovu ávirkar talið av børnum í barnagarði í fýra ár fram.

Tað er tørvur á starvsfólkum á dagstovnaøkinum, og tað hevur við sær, at onkrir stovnar hava havt skert virksemi.[19] Tað kann vera ein avbjóðing fyri bæði starvsfólk og arbeiðsgevarar, um fólk ikki sleppa til arbeiðis vegna vantandi barnaansing. Hetta er ein trupulleiki, ið bæði kommuna og land varða av, tí kommunan umsitur dagstovnaøkið, og landið umsitur útbúgvingarmál, t.v.s. at landið má tryggja, at námsfrøðingar verða útbúnir.

1. januar 2015 varð eldraøkið lagt út til kommunurnar, og eftir tað hava kommunurnar og ikki landið havt ábyrgd av eldraøkinum. Kommunurnar fáa tó ein part av fíggingini afturgoldnan frá landinum. Tosað hevur verið um at endurskoða eldraøkið, eftir at tað varð lagt út til kommunurnar, men tað er ikki gjørt enn.[20]

19 Dagstovnaøkið í Havn undir trýsti | Kringvarp Føroya (kvf.fo)
20 Kommunufelagið: Fíggingarleisturin á eldraøkinum má broytast | Kringvarp Føroya (kvf.fo) ( 23.03.23)



Sum tølini vísa, so er bíðilistin á eldraøkinum minkaður. Torført er tó at siga, hvør orsøkin til hetta er. Men ein orsøk kann vera fyribyrging við venjingum hjá fysioterapeutum og ergoterapeutum. Ein onnur orsøk kann vera, at umlættingar- og rehabiliteringsdepilin URD er latin upp, og at fólk sleppa til umlætting og venjing. Leggjast kann eisini afturat, at 9 búpláss eru komin afturat í Tórshavnar kommunu, men tað er ikki øll frágreiðingin, um hví listin er minkaður.

| Mánaður/ár | Visiteraði | Herav raðfest | Skrásett uttan tørv |
|---|---|---|---|
| 03.09.2019 | 88 | 43 | 143 |
| 14.09.2020 | 83 | 44 | 150 |
| 15.09.2021 | 54 | 25 | 154 |
| 23.09.2022 | 45 | 15 | 145 |
| 20.09.2023 | 45 | 9 | 155[21] |

**VIÐMERKING:** *Visiteraði merkir, at kommunan hevur verið og tosað við borgaran um tørv, og út frá hesum verða summi teirra sett á raðfestan lista, sum merkir, at tey hava bráðfeingis tørv.*

21 Kelda: Tórshavnar kommuna

# 10 Grønur politikkur – kommunalur og vinnuligur

**Í samtyktini hjá Vinnunevndini** og Fíggjarnevndini verður víst á, at álitið um vinnupolitikk eisini skal gera greitt, hvør uppgávan hjá vinnuni og kommununi er fyri at skapa eitt burðardygt vinnulív.

## 10.1 Grøn kommuna

Rákið í løtuni gongur móti grønari og burðardyggari vinnu og kommunum. Hetta er galdandi úti í heimi, og tekur alsamt meira dik á seg her heima.

Um kommuna og vinnulív skulu verða burðardyggari og grønari, eiga kommunan og landið at taka stig ta leiðina. Tað kunnu kommunan og landið gera við at seta krøv til sín sjálvs og til vinnulívið.

Í fleiri førum hava vinnan og fyritøkur sjálvar tikið fet á grønu leiðini, eitt nú við at skilja rusk, hava grønan roknskap, leggja um til grøna orku o.s.fr. Men umráðandi er, at kommunan gongur á odda. Eitt stig varð tikið í ár, tá kommunan fekk tveir el-bussar, sum byrjaðu at koyra í mai 2023. Royndirnar við el-bussum er ein partur av grønu umleggingini hjá kommununi næstu árini.[22] Eisini hava onkrir bygningar hjá kommununi fingið grønar orkuloysnir.

Harumframt mugu land og kommuna eisini gera ætlanir fyri útstykkingar viðvíkjandi náttúru, plantulívi, djóralívi og landbúnaði.

## 10.2 Grønt vinnulív

Vinnuhúsið sigur seg fáa alsamt fleiri fyrispurningar frá limum sínum um ráðgeving um burðardygd og hevur tí sett fólk í starv til hetta.[23] Nýggi ráðgevin í Vinnuhúsinum hevur í miðlunum sagt, at um fyritøkur ætla at vera til í framtíðini, noyðast tær at gera burðardygd til part av virkseminum fyrr ella seinni.[24] Summar fyritøkur vísa eisini á, at viðskiftafólk og samstarvspartar spyrja um burðardygd og grønan politikk.

22 Nú byrja elbussarnir hjá Bussleiðini at koyra á leið 4 – Tórshavnar kommuna (torshavn.fo)
23 Industry
24 Fyritøkur noyðast at hugsa um burðardygd | Kringvarp Føroya (kvf.fo)

Her er neyðugt at hava hugtakið „greenwashing“ í huga. Tað merkir, at vinnulív, kommunur og onnur skulu skjalfesta, at tey gera okkurt fyri at verða burðardygg, og at tey gera okkurt fyri umhvørvið. Tað eru greiðar reglur um, at ein fyritøka skal kunna prógva síni viðurskifti, um hon lýsir við burðardygd, grønum politikki og øðrum. Brúkaraumboðið hevur á heimasíðu sínari vegleiðing um at brúka uppáhald um burðardygd í marknaðarførslu.[25] Har verður víst á, at verður lýst við burðardygd og líknandi, eru krøv til skjalprógv: „Skyldan at skjalprógva er t.d. víðtøknari fyri leys, almenn uppáhald um burðardygd (t.d. „umhvørvisgóður“, „grønur“, „veðurlagsjáttandi“) enn fyri uppáhald, sum innihalda sakligar og neyvar framleiðsluupplýsingar. Tað er eisini týdningarmikið, at skjalprógvanin er dagførd og røtt fyri alt tíðarskeiðið, sum tað tíðarbæra uppáhaldið skal verða brúkt í marknaðarføringini av einari vøru.“[26]

## 10.3 Rusk og endurnýtsla

Neyðugt er eisini, at tær tænastur, ið kommunan veitir vinnulívinum hjálpa vinnulívinum at gerast grønari og burðardyggari. Tí kommunalar tænastur er ein umráðandi partur av vinnupolitikkinum.

25 Bruk.fo
26 VEGLEIÐING FRÁ BRÚKARAUMBOÐNUM UM AT BRÚKA UPPÁHALD UM BURÐARDYGD Í MARKNAÐARFØRSLU



Ein týdningarmikil tænasta, sum kommunan veitir vinnulívinum, er rusktænastan, at vinnan sleppur av við rusk, og at til ber at skilja ruskið. Tað er Kommunala Orku- og Brennistøðin (KOB), ið tekur sær av ruskinum í Tórshavnar kommunu. Júst henda tænastan er eisini avgerandi, um vinnulívið skal gerast grønari.

Tórshavnar kommuna orðaði í 2016 Grønu leiðina, har kommunan setti sær nøkur mál. Millum málini vóru, at allur hiti og streymur í 2030 skuldi koma frá varandi orku, at burturkastið skuldi minka, og endurnýtslan av burturkasti skuldi vaksa við 30 prosentum í 2030 samanborið við 2016.[27]

Nakað av burturkasti verður í dag skilt og endurnýtt, eitt nú papp, pappír og jarn.

Hinvegin, so ber ikki til at skilja matleivdir. Orsøkin er, at til ber ikki at skilja kjøtleivdir, tí myndugleikarnir meta, at vandin fyri, at seyðasjúkan ridluskriði spjaðir seg, er ov stórur.[28]

Hetta er annars eitt stórt ynski frá vinnuni. Her eru tað serstakliga gistingarhús, matstovur og matvøruhandlar, ið vilja sleppa at skilja matleivdir, tí tað er partur av grøna politikkinum hjá teimum. Hetta er eisini eitt av átøkunum í ferðavinnupolitikkinum hjá kommununi:

27 Grøna Leiðin (2016)
28 Kelda: Heilsufrøðiliga Starvsstovan, Umhvørvisstovan.

„Tórshavnar kommuna eigur í samráð við m.a. Heilsufrøðiligu Starvsstovuna at finna loysnir fyri, hvussu matleivdir skulu handfarast á burðardyggasta hátt."[29]

Heldur ikki húsarhald í Tórshavnar kommunu sleppa at skilja matleivdir. Ein kanning, sum Tórshavnar kommuna læt gera í 2022 av húsarhaldsruski vísti annars, at 55 prosent av burturkastinum eru matleivdir. Hetta er meira enn í grannalondum okkara. Hvørki vinna ella húsarhald skilja ruski, so m.a. matleivdir kunnu skiljast burturúr.[30]

Í 2023 fóru Tórshavnar kommuna, biogassverkið Førka og nakrar heilsølur, nøkur gistingarhús og onnur undir eina royndarverkætlan, har biogassverkið Førka tók ímóti matleivdum frá teimum, sum vóru partur av verkætlanini. Fyribils var tó bert talan um grønmeti og frukt, sum vórðu skild og síðani latin Førka. Verkætlanin riggaði væl, og tí er nú gjørligt hjá stórkøkum og øðrum matvøruhandlum at koma uppí.[31]

Eitt annað, sum ikki verður skilt, men sum annars ber til at endurnýta, er timbur. Alt timbur, ið KOB tekur ímóti, verður brent og sostatt ikki endurnýtt. Orsøkin er plásstrot á ruskplássinum á Hjalla, og tí eru ikki umstøður at skilja timbrið og hava tað liggjandi. Ætlanir

29 Ferðavinnupolitikkur Tórshavnar kommuna 2022 – 2026
30 55% av burturkastinum eru matleivdir – Tórshavnar kommuna (torshavn.fo)
31 Frukt og grønmeti til biogass – Tórshavnar kommuna (torshavn.fo)



hava verið um at byggja eina skilji- og endurnýtsluhøll, arbeitt verður í løtuni við at útvega lendi.[32]

Glas og annað verður skilt á Hjalla. Byrjað var í 2020 at samla glas, t.v.s. glaskrukkur v.m., inn til endurnýtslu, men tað gongur seint at fylla bingjurnar til hetta, tí tað bara verður savnað inn á Endurnýtsluni á Hjalla. Til ber ikki at lata glas til endurnýtslu í sambandi við ruskinnsavning ella til skiljistøð í kommununi.

Tí vísir Brennistøðin í umhvørvisfrágreiðing sínari á, at tann skipanin átti at verið víðkað til eisini at fevna um ruskinnsavningina og/ella skiljistøðir í kommununi.[33] Hetta hevði væntandi havt við sær, at meira kom inn av glasi til endurnýtslu. Kommunan arbeiðir í løtuni við at seta støð upp við handlar, har fólk kunnu lata glas og annað til endurnýtslu.

Talvan niðanfyri vísir býtið millum burturbeiningarbólkar hjá Brennistøðini:

| | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Endurvinning, tons** | 7095 | 4334 | 7512 | 5887 | 5214 |
| **Orkuútvinning, tons** | 16.700 | 15.680 | 17.361 | 16.812 | 15.871 |
| **Tyrving, tons** | 1743 | 1968 | 2605 | 2207 | 1716 |
| **Samanlagt, tons** | **25.338** | **21.982** | **27.478** | **24.905** | **22.801**[34] |

32 Høvuðsstaðurin skal skilja meira burturkast | Kringvarp Føroya (kvf.fo)
33 Umhvørvisfrágreiðing 2022 Kommunala Brennistøðin
34 Umhvørvisfrágreiðing 2022 Kommunala Brennistøðin

Orsøkin til, at nøgdin av endurvinning minkar í 2021 og 2022 er, at jarn bara varð avskipað tvær ferðir í 2021 og 2022.

At nøgdin av orkuútvinning, t.v.s. brendum ruski, minkar í 2022 er, tí at brennistøðin varð umvæld móti ársloki 2022, og tí lá still. Ein partur av ruskinum varð tí sendur uttanlands at brenna.

Brennistøðin hevur eisini samstarv við brennistøðina hjá IRF, og tí fer alt papp og pappír og øll spillolja, ið KOB tekur ímóti, til IRF. Hinvegin tekur KOB sær av t.d. øllum bilvrakum, eisini teimum, sum fara til IRF.

Vinnan rindar fyri at lata ruskið inn, og prísirnir hava verið teir somu síðani 2012.[35]

35 Príslisti Kommunala Brennistøðin



# 11 Grannalív og vinnulív

**Ein kommunalur vinnupolitikkur** eigur eisini at hava í huga, at umráðandi er, at vinnulív og grannalív trívast saman. Tað slepst neyvan undan, at vinnulív hevur onkra ávirkan á grannaløg, men her eiga kommuna og vinnulív at laga tað so, at ávirkanin á grannar er so lítil, sum yvirhøvur til ber. Hetta vísir kommunan eisini á í kommunuætlanini: „Ídnaðarvinna verður vegna umhvørvisárin og ljóðdálking staðsett burtur frá bústaðarøkjunum í teimum ídnaðarøkjum, ið eru í dag, og í havnarøkjum, har atkomumøguleikarnir eru góðir. Tung ferðsla verður, í mestan mun leidd uttan um bústaðarøkini.“[36]

Grannar hava t.d. gjørt vart við, at óljóð av havnarløgum er ov nógv. Eftir tað hava kommunurnar og Kommunufelagið tikið stig til Felagskommunalu havnarreglugerðina um m.a. óljóð.

Sambært reglugerðini sleppa skip ikki í føroyska havn, um tey bróta markvirðini, og um tey ikki fáa viðurskiftini í rættlag innan

36 Kommunuætlan 2020

6 mánaðir. Hjá trimum skipum var ljóðstigið so høgt, at tey í 2022 fingu bann fyri at koma í føroyska havn.[37]

Felags kommunala havnarreglugerðin ásetur hesi markvirði fyri gang:

**1.1. Lágfrekventa motorljóðið frá skipi, sum liggur við bryggju í meira enn 2 tímar, skal ikki fara upp um hesi markvirði:**

| **TALVA 1: Markvirði** *(einstøk skip, 25 m frá skipssíðu)* | **Frá 1. januar 2022** | **Frá 1. juli 2023** | **Frá 1. januar 2025** |
|---|---|---|---|
| **Kl. 23-07** | 58 dB | 56 dB | 54 dB |
| **Kl. 07-23** | 60 db | 58 db | 56 dB |

**1.2. Samlaða lágfrekventa motorljóðið frá fleiri skipum, sum liggja lið um lið við bryggju í meira enn 2 tímar, skal ikki fara upp um hesi markvirði:**

| **TALVA 2: Markvirði** *(fleiri skip lið um lið, 25 m frá skipssíðu)* | **Frá 1. januar 2022** | **Frá 1. juli 2023** | **Frá 1. januar 2025** |
|---|---|---|---|
| **Kl. 23-07** | 60 dB | 58 dB | 56 dB |
| **Kl. 07-23** | 60 db | 60 db | 58 dB |

37 Kommunufelagið samtykt nýggjar reglur um óljóð (kf.fo)



Harumframt fevnir reglugerðin eisini um tað, ið verður kallað óneyðugur larmur og óneyðugur roykur:

„***Óneyðugur larmur:*** Hugtakið skal skiljast breitt í mun til tær veitingar, sum havnin letur, og tað virksemi, sum mest skynsamt fer fram við kai. Virksemi so sum samskifti umvegis hátalarar (heldur enn oyrnatelefon/headset), banka rust, og tílíkt kann eftir ítøkiligari meting vera at meta sum óneyðugur larmur – serliga um virksemið fer fram um náttina ella sunnu- og halgidagar.

***Óneyðugur roykur:*** Fevnt av hugtakinum er roykur frá skorsteinum/útstoytum, sum er nógvur, skemmandi og/ella hevur ringan deym. Roykur í sambandi við komu og fráferð er ikki fevnt av hugtakinum.“[38]

## 11.1 Havnavirksemi

Tórshavnar havn er størsta havn í landinum og er eisini ein depil fyri skipaferðslu í Norðurhøvum. Nógv virksemi er á havnarløgunum í kommununi við farmaskipum, fiskiskipum, ferðavinnuskipum og øðrum. Virksemið gevur inntøkur og arbeiði, men hetta er eisini virksemi, sum í ávísum førum ávirkar grannar og umhvørvið við gangi, ljósi, óljóði, lukti og royki.

38 Felagskommunala havnarreglugerðin (2. útg. – jan. 23)

Ynski frá grannum hevur leingi verið, at skip fáa møguleika at binda í landstreym, so óljóðið frá skipum minkar. Í Tórshavnar havn kunnu skip taka landstreym fleiristaðni. Í Havn er landstreymur á molanum, á Bursatanga, á Vónarkaiini, á Ískaiini og við Vestaru Bryggju. Skipasmiðjan MEST kann veita skipum landstreym við Kjartansmola. Tórshavnar havn kann eisini veita landstreym á Sundi, á Oyrareingjum og í Kollafirði. Flestustaðni ber til at fáa 63 ella 125 amper, og í einum stað á Vestaru Bryggju ber til at fáa 250 amper. 63 amper og 125 amper er vanliga nóg mikið til smærri og miðalstór skip, sum ikki hava frystiútgerð gangandi. Tórshavnar havn hevur eisini gjørt ymsar fyrireikingar til landstreymsskipanir á nýggju Skansabryggjuni, m.a. annað lagt káplar og dragirør fram við bryggjukantinum.

Í grannalondum okkara eru havnir, ið hava fingið sær landstreym til skip. Bergen hevur størstu støð til landstreym í Evropa. Havnin í Bergen er farin at seta krøv um landstreym sum part av kravinum um burðardygd. Harumframt mátar havnin útlátið hjá skipum, tá ið tey liggja við kai. Skipini, ið hava størsta útlát, rinda meira enn skip við minni útláti. Frá 2026 verður krav, at øll ferðamannaskip, ið vitja havnina í Bergen, skulu nýta landstreym.[39]

Tøl hjá Bergen havn vístu í juli 2023, at 26 prosent av ferðamanna-

39 Bergen Havn stiller krav



skipunum nýttu landstreym. Skip, ið kunnu taka landstreym, fáa framíhjárætt í mun til onnur skip at sleppa inn í Havnina í Bergen.[40]

Eisini aðrar stórar havnir, sum t.d. Aarhus havn[41] og Esbjerg havn, hava landstreym. Skagen havn hevur somuleiðis sett útgerð til landstreym upp, útgerð, sum eisini megnar at veita uppsjóvarskipum streym. Hetta er ein íløga upp á umleið 10 milliónir krónur, men uppsjóvarskipini eru farin at brúka landstreym.[42]

40 26 prosent av cruiseskipene på landstrøm (bergenhavn.no)
41 Først i Danmark: Aarhus er klar med grøn strøm til store skibe | amtsavisen.dk
42 Boom i salg af landstrøm på Skagen Havn

# 12 Vinnulív í Tórshavnar kommunu

**Havnin er gomul vinnukommuna**, og til stuttleika kann nevnast, at fyrstu partafeløgini í kommununi vórðu sett á stovn í 1919.[43]

Vinnulívið í Tórshavnar kommunu er nógv broytt síðani tá, og hesin parturin fer at lýsa støðuna í dag við vinnulívinum í Tórshavnar kommunu.

Tað ber ikki til at nágreina føroyskt vinnulív í smálutir, tí ongin virkisskrá er gjørd fyri Føroyar, og tí er ongin savnað skrá enn fyri fyritøkur, stovnar og annað í Føroyum. Tí ber heldur ikki til við vissu at staðfesta, hvussu nógvar fyritøkur ella stovnar eru í einari kommunu, hvørki í Tórshavnar kommunu ella øðrum kommunum. Løgtingið samtykti í 2018 at gera eina almenna virkisskrá, og arbeitt verður við hesum í løtuni. Talgildu Føroyar leiða verkætlanina í samstarvi við Skráseting Føroya, TAKS, Hagstovuna og Gjaldstovuna.[44]

43 Skráseting Føroya
44 - Talgildu Føroyar



Tøl hjá Skráseting Føroya vísa, at tað eru 2029 virkin feløg í Tórshavnar kommunu.[45] Talan er um partafeløg, smápartafeløg og íverksetarafeløg. Men hesi hagtølini kunnu í sjálvum sær ikki brúkast til at nágreina vinnulívið í kommununi, tí talan kann vera um sama eigara, dótturfeløg o.s.fr.

Sum sagt, so ber ikki til neyvt at siga, hvussu nógvar fyritøkur og stovnar eru í hvørjari kommunu í Føroyum. Men í sambandi við arbeiðið at orða vinnupolitikk fyri Tórshavnar kommunu hevur Hagstovan gjørt yvirlit yvir, hvussu nógvar fyritøkur hava høvuðssæti sítt í Tórshavnar kommunu. Tølini vísa, at tað er vaksandi virksemi í Tórshavnar kommunu

**Hvussu nógvar fyritøkur eru í Tórshavnar kommunu** (høvuðssæti)

| Ár | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 |
|---|---|---|---|---|---|
| | 901 | 903 | 940 | 983 | 982[46] |

**VIÐMERKING:** *Hagstovan arbeiðir við at byggja innanhýsis virkisskrá, har høvuðssætið hjá fyritøkum verður skrásett. Tí skulu hesi tølini takast við stórum fyrivarni.*

Talan er um privatar fyritøkur, sum hava rindað løn í november árinum fyri til í minsta lagi ein lønmóttakara. Sjálvstøðug vinnurekandi eru ikki við í hesi uppgerðini. Almenn partafeløg er heldur ikki við í uppgerðini.

45 Skráseting Føroya 1. mai 2023
46 Hagstovan juni 2023

Fyritøkur, ið hava høvuðssæti í aðrari kommunu, men hava deildir í Tórshavnar kommunu, eru ikki við í hesum tølum. Tí kann vera talan um, at fleiri fyritøkur eru og virka í kommununi, enn hagtølini siga, men at 982 fyritøkur hava høvuðssæti sítt í Tórshavnar kommunu.

## 12.1 Lønmóttakarar í Tórshavnar kommunu

Tølini fyri, hvussu nógv arbeiða hjá tí privata, og hvussu nógv arbeiða hjá tí almenna, eru rættuliga jøvn, men tey eru fleiri í Tórshavnar kommunu, sum arbeiða hjá privatum arbeiðsgevara. Tað vísa tølini hjá Hagstovuni.

Vart skal gerast við, at allar talvurnar fevna um borgarar, búsitandi í Tórshavnar kommunu, millum 16 og 74 ár. Talan ikki neyðturviliga um fólk, ið arbeiða hjá fyritøkum og stovnum í Tórshavnar kommunu, tí tølini fevna eisini um borgarar í Tórshavnar kommunu, sum arbeiða hjá fyritøkum og stovnum í aðrari kommunu.

Fólk, ið búgva í øðrum kommunum, men sum arbeiða hjá fyritøku ella stovni í Tórshavnar kommunu, eru ikki við í hesum tølum.

Gev gætur, at almenn partafeløg ikki telja við í tí privata, men sum partur av tí almenna.

**Hvussu nógv, sum búgva í Tórshavnar kommunu, arbeiða hjá tí privata?**

| Ár | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Tilsamans** | **5921** | **6150** | **6091** | **6307** | **6337**[47] |

**Hvussu nógv arbeiða hjá tí almenna/kommunala/ interkommunala**

| Ár | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 |
|---|---|---|---|---|---|
| | 3626 | 3570 | 3646 | 3702 | 3719[48] |
| | 1694 | 1819 | 1828 | 1868 | 2025[49] |
| **Tilsamans** | **5320** | **5389** | **5474** | **5570** | **5744** |

## Kynsbýti millum alment og privat

Tølini vísa eisini, at meirilutin av kvinnum arbeiðir hjá tí almenna ella kommunala, meðan meirilutin av monnum arbeiðir í privata vinnulívinum.

47 Hagstovan juni 2023
48 Land/grunnar/almenn partafeløg
49 Kommunur/interkommunalir felagsskapir

Talvurnar báðar fevna um fólk, sum búgva í Tórshavnar kommunu í aldrinum 16 til 74 ár. Talan er ikki um størv staðsett í Tórshavnar kommunu. Tí kunnu hesi eisini arbeiða í aðrari kommunu. Fólk, ið búgva í øðrum kommunum, men arbeiða í Tórshavnar kommunu, eru ikki við í uppgerðini.

## Kynsbýtið millum kvinnur og menn í kommununi á arbeiðsmarknaðinum alment/privat.

**Alment/kommunalt og almenn partafeløg**

| Ár | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 |
|---|---|---|---|---|---|
| K | 3416 | 3593 | 3661 | 3750 | 3854 |
| M | 1798 | 1996 | 1813 | 1820 | 1890 |
| **Tilsamans** | **5320** | **5389** | **5474** | **5570** | **5744** |

**Kynsbýti millum starvsfólk hjá tí privata**

| Ár | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 |
|---|---|---|---|---|---|
| K | 2084 | 2135 | 2104 | 2181 | 2166 |
| M | 3837 | 4015 | 3987 | 4126 | 4171 |
| **Tilsamans** | **5921** | **6150** | **6091** | **6307** | **6337** |



Tað kemur neyvan óvart á, at meirilutin av kvinnum arbeiða hjá tí almenna, meðan meirilutin av monnum arbeiðir hjá tí privata. Eitt tað største almenna arbeiðsplássið í landinum, Landssjúkrahúsið, er í Tórshavnar kommunu. Har eru starvsbólkar, sum í høvuðsheitunum fevna um kvinnur, t.d. sjúkrarøktarfrøðingar. Á sama hátt er t.d. skipasmiðjan MEST eitt stórt arbeiðspláss í kommununi, har tað í høvuðsheitunum eru yrki, ið hava fleiri mannfólk enn konufólk.

## 12.2 Útlendsk arbeiðsmegi

Talið av útlendskum starvsfólki er vaksið seinastu árini og veksur framvegis.[50] Talan er bæði um borgarar úr ES, men við fast track-skipanini hevur vinnan eisini fingið arbeiðsmegi uttan fyri ES. Skipanin kom í gildi 18. nov. 2021. Skipanin styttir um viðgerðartíðina og ger tað lættari hjá vinnuni at fáa arbeiðsmegi úr triðjalondum, tað eru lond uttan fyri ES og Norðurlond. Skipanin er í gildi, so leingi arbeiðsloysið er undir 3, 5 prosent.[51]

Arbeiðsloysið í Føroyum var 0,6 prosent í mai 2023.[52]

50 Løntakarar | Hagstova Føroya
51 Útlendingastovan
52 Arbeiðsloysi | Hagstova Føroya

**Gongdin við útlendingum, sum arbeiða hjá tí privata í Tórshavnar kommunu**

| Ár | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 |
|---|---|---|---|---|---|
| | 400 | 475 | 484 | 526 | 681[53] |

Sum tølini vísa, so er talið av útlendskari arbeiðsmegi vaksið við oman fyri 280 fólkum seinastu fimm árini. Talan er um útlendingar, sum ikki eru danskir ríkisborgarar, sum búgva í Tórshavnar kommunu, og sum eru løntakarar og arbeiða hjá privata vinnulívinum.

Flestu arbeiða innan byggivinnuna, gistingarhús og matstovuvirksemi og innan húsarhaldstænastur.

## 12.3 Integratión av útlendingum

Útlendingamál er danskt málsøki, men Útlendingastovan er hoyringarmyndugleiki viðvíkjandi føroyskum viðurskiftum. Harumframt samskipar Útlendingastovan virksemi, ið hevur við integratión at gera.

Arbeiðsgevarin hevur ábyrgdina av starvsfólkum sínum, eisini útlendskum starvsfólkum. Men Vinnuhúsið vegleiðir eisini fyritøkuum um útlendska arbeiðsmegi.[54]

Integratión er ein umráðandi partur, tá ið talan er um útlendska arbeiðsmegi. Verður hugt eftir lógarverkinum, so er ábyrgdin hjá landinum, men kommunan hevur av sínum eintingum tikið ábyrgd av integratión. Kommunan hevur ein integratiónssamskipara. Partur av uppgávuni hjá integratiónssamskiparanum er, saman við politisku skipanini, at seta kós og standa fyri integratiónstiltøkum, sum venda sær til einstaka tilflytaran og tilflytarar sum heild og til kommunalu virkisøkini við tí máli at menna góða integratión.[55]

Ein partur av integratiónini er eisini mál. Í fleiri ár hevur verið skipað fyri skeiðum í m.a. føroyskum fyri útlendingar á Tórshavnar Kvøldskúla.[56]

53 Hagstova Føroya juni 2023

54 Industry
55 Fía Lindenskov nýggjur integratiónssamskipari – Tórshavnar kommuna (torshavn.fo)
56 Tilflytarar lokið prógv í føroyskum sum annaðmál – Tórshavnar kommuna (torshavn.fo)

# 13 Slag av virksemi

**Vinnulívið í Tórshavnar kommunu** er fjølbroytt. Talan er m.a. um aling, bygging, mentan og felagsskapir, fígging og trygging, fiskavøruídnað, fiskiskap, gistingarhús og matstovur, handil og umvæling, skipasmiðjur, sjóvegis flutning, vinnuligar tænastur o.s.fr.[57]

Tá ið ræður um starvsfólk og umsetning, er talan eisini um samansett vinnulív. Talan er um rættuliga stórar fyritøkur, smærri fyritøkur og einstaklingsvirki.

## 13.1 Vinnulív og búskapur

Nógva vinnuvirksemið í Tórshavnar kommunu sæst aftur í lønargjaldingunum, sum eru oman fyri tvær milliardir, vísa tøl hjá Hagstovuni.

57 Hagstovan juni 2023



| | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 |
|---|---|---|---|---|
| Ali- og kryvjivirki | 55.694.604 | 58.502.812 | 71.140.629 | 79.394.365 |
| Almenn fyrisiting v.m. | | | | |
| Annar ídnaður | 96.575.734 | 99.076.169 | 101.924.814 | 107.410.999 |
| Bygging | 354.205.903 | 377.723.464 | 357.819.472 | 355.132.206 |
| Felagsskapir, mentan o.a. | 76.632.980 | 78.371.458 | 90.689.200 | 94.419.255 |
| Fígging og trygging | 198.671.480 | 199.327.151 | 202.850.085 | 204.197.331 |
| Fiskavøruídnaður | 29.222.170 | 32.500.999 | 37.283.912 | 36.766.656 |
| Fiskiskapur | 191.378.945 | 200.373.526 | 190.324.307 | 246.113.799 |
| Flutningur annars | 104.126.744 | 101.146.263 | 109.999.242 | 110.377.357 |
| Gistihús og matstovuvirki | 101.547.710 | 84.388.866 | 106.515.195 | 136.328.462 |
| Handil og umvæling | 454.184.242 | 468.274.922 | 503.290.357 | 512.794.904 |
| Heilsu- og almannaverk | 43.021.776 | 46.007.284 | 52.863.148 | 52.911.368 |
| Húshaldstænastur | 39.108.661 | 40.727.170 | 48.520.625 | 50.828.723 |
| Landbúnaður | 12.653.063 | 12.998.404 | 13.319.646 | 13.496.881 |
| Orku- og vatnveiting | 760.948 | 2.223.770 | 3.072.258 | 5.247.416 |
| Ótilskilað v.m. | | | | 2.641.365 |
| Postur og fjarskifti | 4.089.730 | 347.197 | 592.242 | 392.488 |
| Ráevnisvinna | 8.482.120 | 7.457.991 | 9.742.142 | 10.480.710 |
| Sjóflutningur | 115.633.573 | 115.507.950 | 124.511.538 | 118.052.472 |
| Skipasmiðjur, smiðjur | 90.557.365 | 99.456.686 | 92.431.984 | 97.888.948 |
| Undirvísing | 7.093.939 | 7.988.730 | 9.131.387 | 9.869.311 |
| Vinnuligar tænastur | 230.825.385 | 238.040.162 | 256.405.900 | 283.178.950 |
| | **2.214.467.072** | **2.270.440.974** | **2.382.428.083** | **2.527.923.966** |

**VIÐMERKING:** *Talan er um borgarar í Tórshavnar kommunu. Talan er tí ikki um størv í TK. Eisini kunnu hesi arbeiða uttan fyri TK.*[58]

58 Hagstova Føroya juni 2023

Størstu samlaðu lønargjaldingarnar eru í bólkunum handil og umvæling, bygging, vinnuligar tænastur, fiskiskapur, fígging og trygging. Tilsamans eru lønargjaldingarnar seinastu árini vaksnar við góðum 300 milliónum. Vart skal gerast við, at í 2020 var heimurin raktur av koronu, og tað sæst aftur í lønargjaldingunum fyri gistihús og matvøruvirksemi.

Nógva virksemið í vinnuni sæst eisini aftur í gongdini í partafelagsskattinum, ið kommunan fær inn:[59]

- **2019** – 49.230 mió. kr.
- **2020** – 55.298 mió. kr
- **2021** – 63.667 mió. kr.
- **2022** – 68.221 mió. kr.
- **2023** – 61.500 mió. kr.

At nógv virksemi er í Føroyum – bæði privat og alment – sæst aftur í inntøkunum hjá Tórshavnar kommunu frá skatti og avgjøldum seinastu árini.[60]

59 Kelda: Tórshavnar Kommuna
60 Kelda: Tórshavnar kommuna





- **2019** 846.629 mió. kr.
- **2020** 890.147 mió. kr.
- **2021** 900.238 mió. kr.
- **2022** 949.946 mió. kr.
- **2023** 951.000 mió. kr.[61]

Her skal gerast vart við, at talan er um skattainntøkur sum heild, t.v.s. at talan er bæði um skattainntøkur hjá fólki, sum arbeiða hjá tí privata og/ella hjá tí almenna.

Tølini vísa, at vinnulívið hevur stóran týdning fyri fíggjarstøðuna hjá Tórshavnar kommunu. Partafelagsskatturin er hækkaður nærum 20 milliónir seinastu fimm árini, og skattainntøkurnar eru vaksnar við nærum 200 milliónum.

Hvørki TAKS ella Hagstovan hava tøl, ið nágreina, hvussu nógv av skattainntøkunum kemur frá fólki í privatu vinnuni, og hvussu nógv kemur frá fólki, ið starvast hjá kommunu og landi, tí ber ikki til at fara í smálutir við hesum.

61 Fíggjarætlanin 2024

# 14 Gongdin við útbúgving hjá føroyingum

**Starvsfólk við røttu førleikunum** eru umráðandi fyri vinnulívið. Hóast vinnan bæði brúkar faklærda og ófaklærda arbeiðsmegi, so er útbúgving í fleiri førum ein treyt fyri, at vinnan fær skikkaða arbeiðsmegi – bæði, tá ið tað ræður um vitan og royndir.

## 14.1 Lærlingar

Tað tykist, sum áhugin at fáa sær yrkisútbúgving er vaksandi í Føroyum. Í 2022 vórðu 403 nýggir lærusáttmálar gjørdir, og í 2023 vórðu 376 sáttmálar gjørdir.

**Nýggir lærusáttmálar pr. ár við trendlinju**




*Talið av lærusáttmálum økist.*[62]

Nógv flestu lærusáttmálarnir eru innan handverk.[63]

Metárið var kortini 2007, tá ið 417 fólk fóru í læru.[64] Hetta var beint undan altjóða fíggjarkreppuni, ið tók seg upp tá. Í 2008 og 2009 lækkaði talið av nýggjum lærusáttmálum, og í 2009 vóru 177 nýggir sáttmálar gjørdir. Men síðani byrjaði at ganga framá aftur við lærusáttmálum. Og í dag er talið næstan á sama stigi sum í 2007.

62 www.yrkisdepilin.fo 2024
63 www.yrkisdepilin.fo
64 Metstór tilgongd til yrkisútbúgvingarnar higartil í 2022 (yrkisdepilin.fo)

Tølini hjá Yrkisdeplinum vísa, at nógv flestu læruplássini eru í Suðurstreymoy.

## Lærupláss býtt á øki




*Flest lærupláss og lærlingar eru í Streymoynni. Talan er um lærlingar, ið framvegis eru í læru. Bústaðurin er eftir, hvar lærlingurin býr, tá ið hann skrivar undir sáttmálan.*[65]

[65] www.yrkisdepilin.fo 2024

## Lærlingar býttir á útbúgving




*Flestu lærlingar eru innan húsasmíð, el og maskinsmíð.*[66]

[66] www.yrkisdepilin.fo 2024

## Lærusáttmálar býttir á skúlar




*Læringar fara í flestu førum á skúla í Havn*[67]

[67] www.yrkisdepilin.fo 2024

## 14.2 Lærlingar uttanlands í skúla

Í ávísum førum er neyðugt hjá lærlingum at fara av landinum í skúla í sambandi við útbúgvingina.

Síðani 2005 eru 36 prosent av teimum knapt 6000 lærlingunum, sum eru farnir undir yrkisútbúgving, farnir til Danmarkar á skúla í sambandi við útbúgvingina. Talið av lærlingum, ið fara undir útbúgving, ið krevur skúlagongd í Danmark, er sjáldan meira enn fimm lærlingar pr. útbúgving/ár. Til ber at taka umleið 70 yrkisútbúgvingar í Føroyum. 15 av hesum útbúgvingunum krevja at fara til Danmarkar á skúla.

Tey, ið fara av landinum í skúlaørindum, eru í høvuðsheitunum í læru innan handil og sølu. Yrkisútbúgvingarráðið og Yrkisdepilin arbeiða í løtuni við at fáa gjørt eitt yvirlit yvir tey skúlaskeið, sum føroysku skúlarnir kundu bjóðað uttan stóran eyka kostnað, við at lærlingar kundu samlisið við aðrar útbúgvingar, har samanfall er í innihaldinum fyrstu skúlaskeiðini.[68]

## 14.3 Lesandi

Fróðskaparsetur Føroya er eisini ein útbúgvingarmøguleiki í Føroyum. Umsóknirnar til Setrið minkaðu nakað 2022 í mun til 2021 og 2020. Her skal tó havast í huga, at metnógv søktu inn á Fróðskaparsetrið í 2020 og 2021.

Fróðskaparsetrið fekk 392 umsóknir í 2022 í mun til 456 árið fyri og 453 í 2020. Hetta vóru árini, tá koronufarsóttin herjaði, og kann hetta vera ein orsøk til økta talið av umsóknum. Í 2019 søktu 373 lesandi inn á Setrið. Í 2023 søktu 389 um upptøku á Fróðskaparsetrinum, og er tað nøkulunda tað sama, sum árið fyri.[69]

Flestu umsóknirnar til Setrið eru til sjúkrarøktarfrøði, løgfrøði, námsfrøði og lærara.

**Umsóknir til Fróðskaparsetur Føroya:**

| Ár | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|---|
| Umsóknir | 453 | 456 | 392 | 389 |

Tøl frá Manntali, ið var í 2011, vísa, at Suðurstreymur er tað økið, har flest fólk hava útbúgving. Talan er um miðnám, yrkisútbúgving, bachelorútbúgving ella hægri útbúgving.

68 Svar til §52-fyrispurning í Løgtinginum 08.05.2023.

69 Fróðskaparsetrið

## 14.4 Lestrar- og lærlingabústaðir

Umráðandi er, at lærlingar og lesandi hava bústað undir lestrartíðini. Hetta samsvarar eisini við Bústaðarpolitikkin, sum Tórshavnar Býráð samtykti í 2018. Bústaðarpolitikkurin staðfesti, at kommunan vil nøkta tørvin á bústøðum til lesandi.[70]

Eitt stig varð tikið, tá ið Tórshavnar kommuna og Bústaðir í felag umvældu Kommunuskúlan, sum í dag eitur Finsen. Har eru 33 lestrarbústaðir í bygninginum, sum varð tikin í nýtslu í 2017.

Aðrir lestrarbústaðir eru eisini í Tórshavnar kommunu. Bústaðir varða av Studentaskúlaheiminum á Berjabrekku, ið hevur 16 kømur. Næmingaheimið undir Fjalli er eisini undir Bústøðum og hevur 30 lestrarbústaðir. Næmingaheimini bæði eru í høvuðsheitum ætlað næmingum á miðnámi.[71]

Harumframt er Skúlaheimið í Marknagili, ið er ætlað næmingum á Glasi. Men næmingar á øðrum skúlum kunnu eisini fáa innivist. Næmingaheimið hevur 50 kømur.[72]

Sostatt eru 129 almennir og/ella kommunalir lærlinga- og lestrarbústaðir í Tórshavnar kommunu, har meginparturin er ætlaður til ungdóm á miðnámi.

Harumframt eru privatar fyritøkur, ið hava bústaðir til lesandi.

Tølini vísa, at áhugin at læra og lesa er stórur, og vinnan vísir á, at hon hevur tørv á skikkaðari arbeiðsmegi. Tí eigur kommunan, saman við landinum, at taka stig til, at fáa fleiri lærlinga- og lestrarbústaðir sum skjótast. Kommunan kann útluta økir til lestrarbústaðir, og landið kann somuleiðis biðja Bústaðir byggja lestraríbúðir. Búseta lesandi seg í Tórshavnar kommunu, hevur vinnan betri atgongd til arbeiðsmegi. Harumframt fer partur av hesum ungfólkum at halda fram at búgva í kommununi, tá ið tey eru liðug við útbúgvingina, og tað merkir, at tey eru komandi skattgjaldarar í kommununi og tí við til at fíggja vælferðartænastur og annað í framtíðini.

70 Bústaðarpolitikkur Tórshavnar Kommuna 2018
71 Bústaðir
72 Skúlaheimið í Marknagili – Glasir

# 15 Samferðsluviðurskifti í Tórshavnar kommunu

**Góð samferðsluviðurskifti** eru ein fyritreyt fyri, at fólk og vinna trívast. Vinnan hevur tørv á røttu arbeiðsmegini, og starvsfólk hava tørv á at sleppa skjótt og lætt til og úr arbeiði.

Í Tórshavnar kommunu eru økir, ið hava tørv á góðari bussleið og góðum vegasambandi, og oyggjar, ið hava tørv á góðari sjóvegis farleið.

## 15.1 Bussleiðin

Tórshavnar kommuna hevur ábyrgdina av bussleiðini í kommununi. Bussleiðin er ókeypis, og hon bindur saman bygdir og býir í kommununi. Sjey bussleiðir eru. Endamálið við ókeypis bussum er at fáa fleiri fólk at brúka buss og harvið minka um bilaferðsluna.[73] Bussleiðin er serliga løgd til rættis, soleiðis at fólk sleppa til arbeiðis, og børn og ung sleppa í skúla.

## 15.2 Sjóvegis farleiðirnar

Farleiðina til Nólsoyar og út í Hest røkja Strandfaraskip Landsins. Hetta er lógarásett skylda.[74] Gerandisliga eru millum seks og sjey túrar millum Havnina og Nólsoy. Í vikuskiftunum eru fimm túrar aftur og fram. Tá ið serstøk tiltøk eru í Nólsoy, verða eyka túrar gjørdir. Ternan tekur millum 94 og 294 ferðafólk og 20 bilar. Nógv ferðafólk nýta Nólsoyarleiðina. Í 2023 vóru tilsaman 94.311 ferðafólk og 6819 bilar um fjørðin. 226 fólk búgva í Nólsoy.[75]

Nólsoyingar hava fleiri ferðir gjørt vart við, at ferðasambandið ikki er nøktandi.[76] Millum annað verður Ternan nýtt sum avloysaraskip á øðrum leiðum, og tá koma avloysaraskip á farleiðina til Nólsoyar, ið taka munandi færri fólk, bilar og minni farm.

Strandfaraskip Landsins røkja eisini farleiðina út í Hest. Hestleiðin var partur av Skopunarleiðini hjá Teistanum, áðrenn Sandoyartunnilin

73 Grøna leiðin (2016)
74 Lógasavn (logir.fo) (lóg.nr.82.5.mai 2001)
75 1. mars 2023.
76 Krevja nýggja ferju til Nólsoyarleiðina | Kringvarp Føroya (kvf.fo)

læt upp í desember 2023. Í fjør vóru 6328 ferðafólk og 433 akfør á Hestleiðini. Ferðafólkatalið vaks við meira enn 1100 ferðafólkum í mun til 2022. Ein orsøk er óivað, at Strandferðslan á sumri 2023 gjørdi eina royndarskipan við tilkallitúrum við Erlu Kongsdóttur út í Hest. Tá vaks ferðafólkatalið nógv í juni 2023 í mun til í 2022. 1130 ferðafólk sigldu millum Gomlurætt og Hest í juni 2023 ár í mun til 778 fólk í juni árið fyri.[77]

Mánadag, mikudag, fríggjadag og sunnudag eru tríggir túrar aftur og fram millum Hest og Gomlurætt. Týsdag, hósdag og leygardag eru tveir túrar um fjørðin. 16 fólk búgva í Hesti.[78] Allir túrar á Hestleiðini eru tilkallitúrar.[79]

Hestfólk gjørdu í 2023 vart við, at tey vildu hava fleiri túrar á rutuni, og skrivaðu millum annað: „Við verandi ferðaætlan ber ikki til at búgva í Hesti og arbeiða ella ganga í skúla í Havn." Eisini vístu tey á, at tað er óhøgligt hjá hestfólki at fara til lækna ella onnur ørindi í miðstaðarøkinum. Harumframt er kostnaðarmikið at fáa handverkarar út í Hest at gera umvælingar, tí ferðasambandið ger, at teir mugu bíða eftir ferjuni, hóast teir eru lidnir við arbeiðið, ið teir skuldu gera.

77 Hagtøl SSL
78 1. mars 2023
79 61 Gamlarætt – Hestur- Strandferðslan (ssl.fo)



Nakað av ferðavinnu er í Hestoynni, og hon er eisini darvað av ferðasambandinum, vístu hestfólk á: „Tað hendir meira enn so, at arbeiðspláss, sum ætla sær starvsfólkaútferð leygardag, velja Hest frá, tí tað er ov langt millum túrarnar."[80]

Sjóvegis ferðasamband er ein landsuppgáva, men kommunan eigur at gera vart við, at tørvur er á batum.

Ein skipað farleið má vera út í Hest, um fólk skulu kunna búgva og virka har. Siglingin um Nólsoyarfjørð er til tíðir ov óstøðug, tí Ternan verður tikin úr sigling til aðrar uppgávur. Harumframt er neyðugt, at vøra og annað, ið kemur á land í Nólsoy, sleppur undir tak beinanveg.

### 15.3 Parkerings- og ferðsluviðurskifti

Fyri vinnuna er umráðandi, at starvsfólk sleppa til arbeiðis, og at viðskiftafólk sleppa til fyritøkuna. Tí er umráðandi, at ferðsluviðurskifti, vegir, parkeringspláss og annað eru í lagi.

Vinnan vísir á, at kunningin frá kommununi um vegarbeiði og tiltøk kundi verið frægari, tí vegir ofta verða stongdir, uttan at fyritøkur

80 Um Hestleiðina – sjónarmið frá hestfólki – Tórshavnar kommuna (torshavn.fo)

eru varskógvaðar í nóg góðari tí. Hetta kann vera í sambandi við vegarbeiði, tiltøk og annað.

Harumframt kann vera torført at fáa parkeringspláss hjá viðskiftafólki, og tað kann hava avleiðingar fyri virksemið hjá vinnuni.



# 16 Nýggjar vinnur

**Vinnulívið stendur ikki í stað**, men broytist alla tíð, og nýggjar vinnur og fyritøkur leggjast afturat. Hetta eigur kommunan eisini at hava í huga, tá ið vinnupolitikkur verður lagdur.

Við tí í hyggju at fáa eitt fjølbroyttari vinnulív í Tórshavnar kommunu setti kommunan sær sum mál at skapa neyðugu karmarnar og seta á stovn eitt nýskapanarhús. Endamálið við Hugskotinum er at stimbra kommunala íverksetaraumhvørvið og skapa áhuga og karmar fyri verandi og nýggjum íverksetarum, soleiðis at vit fáa eitt fjøltáttað vinnulív.

Í apríl 2014 læt Hugskotið upp fyri íverksetarum. Góð undirtøka er fyri virkseminum hjá Hugskotinum, sum hevur vundið upp á seg. Í mars 2017 flutti Hugskotið úr miðbýnum út í Sjóvinnuhúsið, har tað eru fleiri pláss til íverksetarar og munandi betri karmar til nýskapanarhúsið.

Upprunaliga var Hugskotið bert eitt sokallað fasu 1-umhvørvi, har fyritøkurnar sita í sama høli, men við íblástri frá grannalondunum

var farið undir at menna fasu 2-umhvørvið ætlað teimum íverksetarafyritøkum, sum eru komnar fetið víðari og hava tørv á størri og egnum kontóri. Fasu 2-umhvørvið er sostatt ætlað fyritøkum, ið eru vaksnar út úr fasu 1-umhvørvinum, men sum vilja verða verandi í umhvørvinum í eina tíð afturat. Fasu 2-kontórini[81] verða leigaði út fyri marknaðarprís. Ásett er í leigumálinum, at ynskiligt er, at fyritøkan er partur av umhvørvinum í Hugskotinum og er við til felags tiltøk eftir førimuni, umframt at fyritøkan deilir vitan og kemur við íkasti til felagsskapin í Hugskotinum.[82] At fyritøkur í fasu 2 nú eisini sita í Hugskotinum, er ein stórur fyrimunur fyri umhvørvið og íverksetarar í fasu 1, ið hava tørv á vitan og royndum frá teimum, sum eru komin stigið víðari. Hetta tryggjar eisini, at umráðandi vitan og netverk verða varðveitt í húsinum.

Harumframt hevði verið gott fyri íverksetaraumhvørvið, um fyritøkur, sum vaksa út úr Hugskotinum, kundu leigað hølir í sama umhvørvi sum Hugskotið og vinnuframapartarnir Vinnuframi, Framtak og Filmshúsið. Á henda hátt ber til at varðveita samband og samstarv við íverksetaraumhvørvið, umframt at tað hevur samvirkanarárin (synergieffekt) við sær.

Hugskotið veitir eisini ráðgeving til fyritøkur og verkætlanir, ið ikki hava innivist í Hugskotinum. 72 íverksetarar ella fyritøkur, sum ikki

81 Trý fasu 2-kontór eru í Hugskotinum.

82 Leigumálið í fasu 2 kann vara upp til tvey ár við møguleika at leingja leigumálið í mesta lagi tvey ár afturat.



høvdu innivist í Hugskotinum, bóðu um ráðgeving umvegis heimasíðuna í 2022.[83]

Síðani Hugskotið byrjaði í 2014, hava tilsamans 181 fyritøkur verið í Hugskotinum. 113 av fyritøkunum eru fluttar úr Hugskotinum. Í løtuni eru 31 aktivar fyritøkur í Hugskotinum. Í meðal er ein fyritøka 16 mánaðir í Hugskotinum.[84] Talan er bæði um einstaklingsvirki og virki við fleiri starvsfólkum. Tølini vísa eisini, at meirilutin av teimum, sum eru íverksetarar eru menn. 59 prosent er menn, og 41 prosent av teimum, ið hava innivist í Hugskotinum eru kvinnur.

Í grannalondum okkara verður mett, at stórir menningarmøguleikar eru í kvinnuligum íverksetarum. Tí arbeiðir eitt nú Dansk Erhverv við at fáa fleiri kvinnur at gerast íverksetarar.[85] Tøl úr Íslandi vísa eisini, at meginparturin av íløgunum í íverksetarafyritøkur fara til fyritøkur hjá monnum, meðan munandi minni íløgur verða gjørdar í fyritøkur hjá kvinnum.[86] Um vinnulívið og politiska skipanin vilja hava fleiri kvinnur at gerast íverksetarar, eiga tey eisini at varpa ljós á hetta.

Hugskotið arbeiðir áhaldandi við at tillaga virksemið eftir tørvinum. Seinastu árini hevur Hugskotið eitt nú raðfest kt-vinnuna við serligum tiltøkum og átøkum, tí ynski er um fleiri vakstrarfyritøkur

83 90 íverksetarar í 2021

84 Tøl frá Hugskotinum mai 2023

85 Kvindelige iværksættere (danskerhverv.dk)

86 Framvis.is

innan kt-vinnuna í Føroyum.[87] Eisini hevur Hugskotið seinastu árini raðfest filmsvinnuna og ferðavinnuna frammarlaga, tí stórir menningarmøguleikar eru í teimum vinnunum.

Fígging og serliga tørvur á váðafúsum íløgum eru eisini ein afturvendandi avbjóðing í íverksetaraumhvørvinum, og samstarvar Hugskotið við eitt nú Noreg, Ísland og Grønland, sum hava líknandi avbjóðingar, um átøk at loysa hesa avbjóðing.

Til ber ikki at siga, hvussu nógvar fyritøkur framvegis eru til, eitt nú tvey ár eftir at tær eru fluttar úr Hugskotinum. Skal hetta kannast, krevst størri arbeiðsorka.

87 Sí Vakstrarforum „FØROYSK KT-VINNA Frá heimamarknaði til heimsmarknað"



# 17 Vinnustykkir

**Ein fyritreyt fyri,** at vinnulívið kann vaksa, er grundstykkir. Tí er umráðandi, at kommunan hevur vinnustykkir klár. Seinastu árini er ein útstykking gjørd til vinnustykkir, talan er um 13 stykkir á Skarðshjalla. Arbeitt verður eisini við eini útstykking á Ovara Hjalla, har tað verða 22 vinnustykkir, umframt at vinnuøkir verða í sambandi við útstykkingina á Argjahamri og við Stórutjørn.

# 18 Ein nýggjur vinnupolitikkur fyri Tórshavnar kommunu

**Í 2010 staðfesti Tórshavnar kommuna** í visjónum og virðisgrundarlagnum hjá kommununi: „Vit vilja, at høvuðsstaðurin gevur nýggjum og altjóða vinnum, og vinnum, sum hava djúpar røtur her, góð vakstrarlíkindi“[88]

Í álitinum til vinnupolitikk hevur arbeiðsbólkurin skrivað uppskot til sjey yvirskipaði evnir við átøkum, ið geva nýggjum og verandi vinnum góð vakstrarlíkindi. Átøkini eiga at verða sett í verk komandi árini, so Tórshavnar kommuna kann gerast ein vakstrardepil í Norðuratlantshavi komandi árini. Tað er eisini partur av visjónini fyri Tórshavnar kommunu.

Summi av átøkunum kunnu gerast beinanvegin, onnur krevja bert smærri tillagingar, og onkur átøk krevja meira. Men endamálið við øllum átøkum er at menna vinnupolitikkin hjá Tórshavnar kommunu og at arbeiða fyri, at karmarnir hjá vinnulívinum í Tórshavnar kommunu eru teir bestu í landinum.

Umráðandi er at halda fast um tað vinnulív og tær fyritøkur, sum eru í kommununi, men týdningarmikið er eisini, at nýggjar vinnur og nýggjar fyritøkur koma afturat, og at tær trívast. Kommunan eigur tí støðugt at endurskoða og hugsa um tiltøk, ið gagna vinnulívinum.

Ein vinnupolitikkur eigur eisini at hava fyrilit fyri trivnaði hjá bæði vinnulívi og borgarum, tí trivnaður hjá vinnulívinum og borgarum hongur óloysiliga saman.

Tí eigur at verða hugsað um, at tað kann verða neyðugt at seta krøv til vinnulív, kommunur og land í ávísum førum fyri at verja náttúru, umhvørvi og grannar. Hinvegin vísa samrøðurnar, at vinnulívið sjálvt førkar seg henda vegin, tí viðskiftafólk seta krøv um burðardygd, náttúruvernd og annað.

Um kommunan setur krøv, er kortini neyðugt at hava vinnulívið við og í ávísum førum at geva vinnulívinum eina skiftistíð at leggja um til burðardyggar loysnir.

Eisini eigur kommunan at seta sær somu krøv, hon setur vinnulívinum, tá ið tað ræður um t.d. grønan politikk og umhvørvi.

88 Visjón og virðisgrundarlag – Tórshavnar kommuna (torshavn.fo)

# 19 Átøk

**Fyri at menna vinnulívið**, bøta um karmarnar hjá vinnulívinum, fáa nýggjar vinnur og nýggj arbeiðspláss hevur arbeiðsbólkurin orðað tilmæli um átøk.

Kommunan hevur ábyrgd av summum av átøkunum, í onkrum føri liggur ábyrgdin hjá landinum, og vinnan sjálv hevur ábyrgd av øðrum átøkum. Í øðrum føri kann talan vera um, at bæði land, kommuna og vinnulív saman mugu taka ábyrgd, um okkurt skal henda.

Kommunan skal ikki reka vinnulív, men skapa karmar, og hetta er eisini útgangsstøði fyri átøkunum, ið bólkurin mælir til, í nýggja kommunala vinnupolitikkinum.

Átøkini miða eftir:

- At verandi vinnulív trívist og fær ment seg
- At nýggjar vinnur hava góðar karmar
- At vinnulív og grannalív trívast saman
- At kommunan mennist sum vinnulívskommuna
- At kommuna og vinnulív í felag røkka grønum málum og verja náttúru og umhvørvi

# 19.1 Átak

## Samstarv millum kommununa og vinnuna

Avgerðir hjá kommunu og býráð hava ávirkan á vinnuna, og í ávísum førum eisini avleiðingar fyri vinnuna. Vinna og borgarar eru fyritreyt fyri inntøkum hjá kommununi. Tí er umráðandi, at tætt samskifti og samband er millum kommununa og vinnuna, so partarnir vita av hvørjum øðrum.

**Skjótar loysnir:** Vinnan hevur tørv á skjótum svari og loysnum viðvíkjandi loyvum og fyrispurningum av ymsum slag, samstundis sum umsitingin hevur lógir og reglur, ið skulu haldast. Í ávísum føri mugu fleiri deildir taka sær av einum loyvi ella fyrispurningi, tí talan er um samansett mál. Hetta kann onkuntíð taka drúgva tíð. Vinnan kann bøta um ein part við at vera væl fyrireikað við skjølum, tekningum og øðrum, áðrenn hon vendir sær til kommununa. Men kommunan kann eisini gera sítt, t.d. við at hava *eina* hurð, har vinnan kann venda sær við fyrispurningum og øðrum. Eina slíka skipan hevur t.d. Køge kommune: „For de virksomheder, der måske har flere spørgsmål eller lidt komplicerede sager har vi etableret én indgang. Her kan du som virksomhed henvende dig..."[89]

89 Flyt din virksomhed til Køge (koege.dk)



Við einari slíkari skipan vísir kommunan, at hon er tænastusinnað og fús at hjálpa vinnuni. Umráðandi er tó sjálvandi, at kommunan samstundis megnar at halda reglur, lógir, kunngerðir og annað. Men tað eigur at bera til at bera skjótt at, samstundis sum lógir, reglur og annað verður hildið.

> **Átak:** Vinnulívið skal hava *eina* hurð inn í kommununa, so fyrispurningar og mál verða skjótt avgreidd. Ein loysn kundi verið ein Vinnuskiva á sama hátt sum Snarskivan.
>
> **Ábyrgd:** Kommunan.

### 19.1.1 Betri kunning og samskifti millum kommunu og vinnu

Rættstundis kunning er avgerandi fyri vinnuna og borgarar. Vinnuni tørvar kunning um, hvørjar ætlanir kommunan hevur, ið ávirka vinnulívið og/ella viðskiftafólk. Tað snýr seg um reglugerðir, ferðsluviðurskifti, parkeringsviðurskifti ella annað. Tá ið eitt nú vegarbeiði er, ella vegir verða stongdir, ávirkar hetta virksemið hjá fyritøkum. Um vinnan ikki fær kunning í nóg góðari tíð, fær hon ikki tillagað seg og missir inntøkur.

Tiltøk sum flaggdagsrenning, mentanarnátt, Tórsfest, Voxbotn, Tórs-

havn maraton o.s.fr. eru løgd til rættis í góðari tíð. Tí ber til at gera eina ársætlan, sum verður dagførd mánaðarliga, har kunnað verður beinanvegin um broytingar og tillagingar í ferðslu í sambandi við hesi tiltøk. Samstundis er umráðandi, at tað er støðug kunning – bæði frá kommununi og fyriskiparunum. Henda kunningin skal vera bæði til borgarar og vinnulívið.

**Átak:** Støðug, rættstundis og dagførd kunning má alla tíð vera frá kommununi um tiltøk, ið ávirka vinnuna, t.d vegastongsul í sambandi við tiltøk ella vegarbeiði. Kommunan skal eisini áleggja fyrireikarum av tiltøkum at bera kunningina víðari.

**Ábyrgd:** Kommunan.

### 19.1.2 Kommunan og vinnan hittast

Áhugi er í vinnuni at hava tættari samband við kommununa og hittast við jøvnum millumbilum. Umráðandi er, at kommunan hevur positivan hugburð móti vinnuni, um vinnan hevur hugskot ella avbjóðingar. Kommunan eigur tí at skipa fyri, at møguleiki er hjá vinnuni at hitta umboð fyri kommununa nakrar ferðir um árið, eitt dømi kundi verið heimleiðisfundir, sum eru stuttir fundir eftir arbeiðstíð. Onkuntíð kundi bara kunning verið á skrá, aðrar tíðir kundu fakligar framløgur verið á skránni.



Vinnuforum er eitt árligt tiltak hjá Hugskotinum og Tórshavnar kommunu. Evnið á Vinnuforum 2023 var „Tórshavnar kommuna sum vinnubýur“. Áhugin fyri tiltakinum var stórur, og sum heild tóktust luttakararnir nøgdir við tiltakið. Tí er eisini umráðandi við slíkum tiltøkum, ið savna vinnu, kommunu og onnur.

**Átak:** Vinnuforum er eitt vælumtókt árligt tiltak. Tað eigur at halda fram og verða styrkt – kanska við einum minni vinnuforum, tá ið tørvur er á tí.

**Ábyrgd:** Kommunan.

**Átak:** Heimleiðisfundir, har vinnan fær kunning og/ella prát.

**Ábyrgd:** Kommunan.

## 19.2 Átak

### Vinnan nú og í framtíðini

Eitt vaksandi og fjølbroytt vinnulív tryggjar kommununi inntøkur og borgarunum arbeiði. Tí er umráðandi, at kommunan er til reiðar at taka ímóti nýggjum fyritøkum og nýggjum hugskotum.

Tórshavnar kommuna fevnir um bygdir, býir og oyggjar. Kommunan eigur tí at tryggja, at góðir møguleikar eru at reka vinnulív í allari kommununi – eisini á smáplássunum.

### 19.2.1. Tórshavnar kommuna – ein nýhugsandi kommuna

Kommunan eigur at seta tilgongd við nýhugsan í verk á øllum økjum, so kommunan gerst meira tíðarhóskandi og dynamisk. Ungfólk og nýggj vitan gagnar kommunu og vinnu, og tað eigur kommunan at hava í huga, tá ið hon setur nýggj fólk í starv.

Tað er umráðandi, at kommunan hugsar nýtt og er innovativ. Tí eigur kommunan eisini at gera eina umskipan, so pláss er fyri einari deild ella tænastu fyri nýskapan, soleiðis sum gjørt er t.d í Reykjavík.[90]

90 https://reykjavik.is/en/department-of-service-and-innovation



Deildin fyri tænastu og nýskapan (ÞON) í Reykjavíkar kommunu hevur til endamáls at umsita bæði innanhýsis og uttanhýsis tænastur fyri kommununa, umframt at fremja nýskapan fyri alt virksemið hjá kommununi. Økini, ið deildin umsitur, eru eitt nú eftirlit við upplýsingartøkni, dátusamskipan, dátugreining, nýskapanartiltøk og aðrar tænastur. Í høvuðsheitunum er endamálið við deildini at virka fyri/tryggja munabetri rakstur av tænastunum og virkseminum hjá kommununi. Deildin hevur eisini ein týðandi leiklut við atliti at íverksetan av tænastupolitikkinum hjá kommununi. Deildin er ein av trimum høvuðsdeildum í kommununi og hevur fimm undirdeildir.

Við miðvísum átøkum frá Tórshavnar kommunu fer eftirspurningurin eftir tænastum frá verandi og nýggjum kt-fyritøkum at økjast. Hetta eru loysnir, sum kunnu geva grundarlag fyri nýggjum fyritøkum og effektivum mannagongdum, sum so aftur kunnu spjaðast til aðrar kommunur og stovnar.

### 19.2.2 Íblástur frá lesandi og íverksetarum

Sum størsta kommuna í landinum eigur Tórshavnar kommuna at ganga á odda við nýskapandi hugburði, sum gagnar kommunu og landi. Kommunan kann bjóða lesandi og lærlingum á føroyskum útbúgvingarstovnum, íverksetarafyritøkum ella øðrum bólkum til

kappingar um nýggjar tøkniligar loysnir og/ella mannagongdir fyri at fremja effektivitet og nýggjar tænastur.

Hetta kann t.d. vera mannagongdir fyri implementering av tøkni á eldraøkinum, menna kt-skipanir til avgreiðslu av borgarum, menning av skipanum fyri at optimera vitanardeilingina í kommununi sjálvari o.s.fr.

Hetta verður gjørt í t.d. Tromsø kommunu, men eisini øðrum universitetsbýum. Kommunan kundi saman við Hugskotinum funnið ein arbeiðsleist og arbeiðsbýtið fyri hesum.

**Átak:** Kommunan eigur at hava eina innovatiónseind og eigur at hava samstarv við lesandi/lærlingar, íverksetarar og onnur um nýhugsan og menning.

**Ábyrgd:** Kommunan.

**Átak:** Nýhugsan eigur at vera, tá ið tað ræður um mannagongdir og annað, so mál og annað verða avgreidd uppaftur betri og skjótari enn í dag. Á henda hátt hevði borið til at ment kommununa, t.d. við at sett í verk skipanir at lætta um avgreiðslu av borgarum, og skipanir, sum fremja vitanardeiling í kommununi.

**Ábyrgd:** Kommunan.



### 19.2.3 Menningardepil í Havn

Kommunan eigur at verja um tað, sum riggar væl, tí tað gevur framburð og menning. Íverksetarahúsið Hugskotið er saman við Filmshúsinum, Vinnuframa, Framtaki og Fróðskaparsetrinum. Stovnarnir hava stórt gagn av at vera undir sama taki. Tí er staðsetingin av Hugskotinum og íverksetarafyritøkunum, sum húsast saman við hinum stovnunum, eitt gott grundarlag fyri eini nýhugsandi kommunu.

Ráðið fyri gransking, menning og nýskapan mælti herfyri landsstýrinum til at seta á stovn ein depil fyri gransking, menning og nýskapan. Hesin depil skal vera staðið, „har heilar hittast", og eitt umhvørvi har nýggir eldar birtast. Við at savna lesandi, granskarar, íverksetarar og vinnulívsfólk ber til at lofta góðum hugskotum um nýggjar loysnir og menning. Eisini vísir ráðið á, at nú vinnuframapartarnir, sum húsast í Sjóvinnuhúsinum, skulu finna sær nýggj høli, er upplagt, at hesir eisini verða hýstir í einum føroyskum hugmyndahúsi saman við Fróðskaparsetrinum.[91]

Fleiri lond og kommunur hava líknandi hugmyndahús ella deplar. Í Íslandi hava tey hugmyndahúsið Gróska, sum er savningardepil fyri nýskapan og samstarv millum hægri útbúgvingarstovnar, íverksetarar og vinnuna, har bæði einstaklingar og størri fyritøkur kunnu

91 Meira samstarv beinanvegin – (gransking.fo)

leiga høli.[92] Og í Aalborg hava tey AAU INNOVATE[93] har granskarar, lesandi og vinnulívið arbeiða saman um hugskot og nýskapan. Eisini í Noregi og í Ísrael hava tey góðar royndir við tílíkum nýskapanardeplum.

Ein menningardepil eigur eisini at vera í Føroyum. Depilin eigur at vera í Havn, tí stovnar og feløg, ið fáast við útbúgving, gransking, menning og nýskapan longu eru í Tórshavnar kommunu.

**Átak:** Hugskotið eigur at verða styrkt, og Hugskotið eigur framhaldandi at vera staðsett saman við vinnuframapørtunum Filmshúsinum, Vinnuframa, Framtaki og Fróðskaparsetrinum.

**Ábyrgd:** Kommunan.

**Átak:** Kommunan eigur at stuðla ætlanunum um ein depil, sum kann vera savningarstað fyri granskarar, nýskaparar, vinnu, íverksetarar, íleggjarar og lesandi/lærlingar.

**Ábyrgd:** Kommunan og landið.

92 Gróska hugmyndahús – Gróska (groska.is)
93 AAU INNOVATE – Science & Innovation Hub – Aalborg Universitet



### 19.2.4. Samstarv og kunning millum kommununa og landið

Tað eigur at vera áhugaverdari at granska í Føroyum, og skal tað henda, mugu land og kommuna samstarva. Skattaskipanir verða ofta brúktar fyri at gera tað áhugavert hjá granskarum at koma til eitt land, og fyri at skunda undir at fyritøkur granska og menna.

Ein slík skipan er í Noregi, har fyritøkur kunnu draga part av útreiðslum fyri gransking og menning frá í skatti.[94] Har er millum annað treyt, at fyritøkan er skattskyldug í Noregi, at talan er um virksemi, ið skal menna vørur, tænastur ella framleiðsluhættir. Vanliga eru tað fyritøkur, ið eru yngri enn 10 ár og hava færri enn 20 starvsfólk, ið kunnu brúka skipanina.[95]

Í Danmark hava tey sokallaða *forskerordningen*, har granskarar í eitt tíðarskeið hava møguleika at fáa skattafrádrátt.[96] Treytir eru við skipanini. Danska Forskerordningen setur m.a. krøv um, at fólk ikki skulu hava verið skattskyldug seinastu 10 árini í Danmark, og at granskarin í fyrsta lagi kann flyta til Danmarkar ein mánað áðrenn fyrsta arbeiðsdag. Tað ber bara til at vera partur av Forskerordningen eina ferð í lívinum.[97]

94 SkatteFUNN
95 Hvem kan søke SkatteFUNN? (forskningsradet.no)
96 Forskerskatteordningen – Skat.dk
97 Forskerskatteordningen – skat.dk

Landið hevur gjørt ætlanina Vakstrarforum[98], har nógv varð gjørt fyri at eyðmerkja vakstrarmøguleikar í Føroyum. Tórshavnar kommuna kann, saman við landinum, gera sítt til, at tilmælini í Vakstrarforum gerast veruleiki. Tí eigur Tórshavnar kommuna at venda sær til Fíggjarmálaráðið um at fáa skattaskipanir fyri granskarar og gransking. Hetta gagnar jú bæði kommununi og landinum.

**Átak:** Skattafrádráttur eigur at vera til serfrøðingar í eitt ávíst tíðarskeið, t.d. eitt ár ella fyrsta árið, ið serfrøðingarnir eru í Føroyum.

**Ábyrgd:** Landið/kommunan.

**Átak:** Fyritøkur eiga at fáa skattfrádrátt fyri íløgur í gransking og menning í eitt ávíst tíðarskeið t.d. fyrsta árið, ið granskað verður.

**Ábyrgd:** Landið/kommunan.

### 19.2.5 Fleiri og hóskandi vinnustykkir

Ein partur av menning og vøkstri er eisini fysisku karmarnir hjá vinnulívinum, t.v.s. bygningar og grundstykkir. Hetta er ein umráðandi partur av karmum og tænastum, ið kommunan skipar fyri vinnulívið. Tí eiga vinnustykkir altíð at vera tøk.

98 Vakstrarforum – Løgmansskrivstovan (lms.fo)





Stykkini eiga at hóska til tørvin hjá vinnuni. Fyritøkur eru ymiskar og hava ymiskan tørv, og tí mugu stykkini vera ymisk í støðd, so tey hóska til tað, ið vinnuni tørvar. Harumframt eiga stykkir og byggisamtyktir at vera so, at ein fyritøka hevur møguleika at víðka virksemið so hvørt, t.v.s. at byggja so hvørt tørvurin fyri meira plássi økist.

Eisini eiga fyritøkur at fáa møguleika at leiga vinnustykkir frá kommununi í eitt ávíst tíðarskeið. Her kunnu treytir setast um, at fyritøkan ikki er størri enn eitt vist, at umsetningurin ikki er hægri enn eitt ávíst, og at talan er um tíðaravmarkað leigumál. Hetta hevði verið ein møguleiki hjá smærri fyritøkum at bøtt um karmarnar. Við hesum hevði eisini verið lættari hjá nýggjum fyritøkum og íverksetarum at fingið bústað í Tórshavnar kommunu.

Fyri grannaløg – bæði vinnuøkir og bústaðarøkir – er eisini umráðandi, at ein fyritøka heldur stykkið hjá sær væl og ruddiligt. Kommunan hevur krøv um hetta[99], men umráðandi er, at kommunan hyggur eftir, at krøvini verða hildin.

Harumframt eigur kommunan at gera tað lokkandi hjá fyritøkum at gera tiltøk, ið gagna grannalagnum, t.d. parkeringspláss, møguleika at knýta í grønar orkuskipanir o.s.fr. Tað merkir, at kommunan má vera smidligari viðvíkjandi bygging og loyvi, so at ein fyritøka t.d. kann gera parkeringspláss/parkeringskjallara, ið grannar og onnur

99 Søk um vinnugrundstykki – Tórshavnar kommuna (torshavn.fo)

eisini fáa brúkt. Tað kundi eisini loyst ein part av avbjóðingunum við parkering í kommununi.

**Átak:** Kommunan skal tryggja, at vinnustykkir altíð eru tøk, og at stykkini nøkta tørvin, ið vinnan hevur. Vinnustykkir skulu vera tøk í øllum bygdum og býum í kommununi.

**Ábyrgd:** Kommunan.

**Átak:** Nýhugsan eigur at vera viðvíkjandi vinnuøkjum, so hesi hóska til tørvin hjá vinnuni. Kommunan skal virka fyri, at vinnuøkir og grannaløg fáa felags gagn av parkeringsplássum, orkuskipanum og øðrum.

**Ábyrgd:** Kommunan.

**Átak:** Kommunan eigur at áleggja fyritøkum at halda økini rundan um hjá sær sjálvum, so hesi eru ruddilig og ikki til ampa fyri grannafyritøkur og bústaðarøkir.

**Ábyrgd:** Kommunan/vinnan.



## 19.3 Átak

### Samferðsla og ferðsluviðurskifti

Ferðsluviðurskiftini eru ein týdningarmikil tænasta, ið kommunan og landið veita vinnulívinum. Hetta er galdandi fyri bæði vegakervið og parkering.

### 19.3.1 Parkeringsviðurskifti

Parkeringsviðurskiftini hava stóran týdning fyri bæði vinnulív, starvsfólk og borgarar. Hetta er bæði galdandi fyri miðbýin, men eisini fyri onnur økir í kommununi. Fólkatalið í Tórshavnar kommunu er vaksið nógv, og vinnulívið veksur eisini, og hetta leggur trýst á parkeringsviðurskiftini.

Tórshavnar kommuna orðaði í 2015 ein parkeringspolitikk. Í honum stendur: „Høvuðsendamálið við parkeringspolitikkinum er at áseta og tryggja, at parkeringsmøguleikarnir í kommununi verða nøktaðir og framtíðartryggjaðir, og at karmar verða gjørdir fyri framtíðar parkering í Tórshavnar kommunu.“[100]

Í parkeringspolitikkinum hjá kommununi verður mælt til at seta

100 Parkeringspolitikkur Tórshavn 2015

ymisk tiltøk í verk. Okkurt av hesum er gjørt, t.d. eru pláss, sum ikki høvdu tíðaravmarking, vorðin tíðaravmarkaði. Við hesum átakinum komu nøkur parkeringspláss afturat.

Parkeringspolitikkurin vísir eisini á, at handilslívið í býnum má hava nøktandi parkeringskor. Sambært parkeringspolitikkinum hjá kommununi so eru tíðarsonur besta loysnin at stýra útskifting av bilum á parkeringsplássunum.[101] Í januar 2023 blivu 24 básar á Skálatrøð gjørdir til parkering í tveir tímar í staðin fyri átta tímar. Broytingin varð m.a. gjørd, fyri at fólk, ið fara til handils ella á matstovu og hava tørv á parkering í styttri tíð, fáa parkeringspláss. Men tað eru framvegis 187 básar við parkering í átta tímar.[102]

Í parkeringspolitikkinum verður m.a. mælt til talgild skelti, sum vísa, hvar tómir básar eru. Eisini verður í parkeringspolitikkinum mælt til, at gjaldsparkering verður sett í verk, t.v.s. at fólk rinda fyri at seta bilin frá sær í eitt ávíst tíðarskeið. Hetta kenna vit eisini úr grannalondum okkara. Parkeringspolitikkurin mælir eisini til at endurskoða kostnaðin á bótini, sum er 200 krónur.

Fleiri av tilmælunum í parkeringspolitikkinum høvdu bøtt um viðurskiftini hjá vinnulívi, viðskiftafólki og borgarum.

101 Parkeringspolitikkur Tórshavn 2015
102 24 básar gjørdir á Skálatrøð til parkering í 2 tímar – Tórshavnar kommuna (torshavn.fo)



**Átak:** Seta í verk tiltøkini, sum mælt verður til í parkeringspolitikkinum hjá Tórshavnar kommunu.

**Ábyrgd:** Kommunan.

### 19.3.2 Betri ferðasamband út í oyggjarnar

Vinnulívið í oyggjunum í kommununi og í smærri bygdunum eigur at hava líka góðar karmar sum vinnulívið annars í kommununi. Ferðasambandið er umráðandi fyri vinnulívið, men eisini um fólk skulu búseta seg á smáplássunum.

Ferðasambandið út í Hest og til Nólsoyar er viðhvørt ov óstøðugt og ger tað trupult at reka vinnu, umframt at tað kann vera avbjóðandi hjá fólki at sleppa til og úr arbeiði. Tað er eisini torført hjá vinnuni at fáa tilfar og at sleppa av við vørur og tænastur. Tí má støðugt ferðasamband vera sjóvegis alt árið. Royndin hjá SSL við Erlu Kongsdóttur í summar vísti, at grundarlag er fyri at hava fleiri túrar um Hestfjørð.[103] Tí eigur kommunan at seta landinum krøv um gott og støðugt ferðasamband. Hetta er eisini lógarkrav sambært lóg um fólka- og farmaflutning: "§2. Landið hevur skyldu at skipa fyri:

103 40% fleiri brúktu Hestleiðina í summar – Strandferðslan (ssl.fo)

1) nøktandi sjóvegis fólkaflutningi, farmaflutningi og/ella flutningi av akførum, ..."[104]

**Átak:** Kommunan skal krevja, at landið tryggjar støðugt og gott ferðasamband út í Nólsoynna og Hest alt árið.

**Ábyrgd:** Landið.

**Átak:** Vøra, ið kemur út í oyggjarnar, skal undir tak beinanvegin.

**Ábyrgd:** Kommunan/landið.

### 19.3.3 Bussleiðin

Á sama hátt sum samferðslan sjóvegis er góð, er eisini umráðandi, at bussleiðin í Tórshavnar kommunu er góð og tíðarhóskandi. Sjey bussleiðir eru í kommununi, men túratalið til onkrar av bygdunum og summi av økjunum er rættuliga avmarkað, t.d. niðan á Hjalla, til Kaldbaks, Kollafjarðar o.s.fr.

Ferðaætlanin hjá bussleiðini eigur at verða endurskoðað við jøvnum millumbilum fyri at tryggja, at hon hóskar til tørvin, ið fólk úti á bygdunum í Tórshavnar kommunu hava. Harumframt eigur eisini at verða kannað, um ferðaætlanin hóskar til teirra, ið arbeiða á vinnuøkjunum í kommununi, eitt nú á Hjalla. Sjálvandi skal tó vera samsvar millum tal av ferðafólki og túrum, so bussarnir ikki koyra tómir ávísar partar av degnum. Men við at eftirmeta ferðaætlanina við jøvnum millumbilum ber til at tryggja hetta. Kommunan eigur eisini at gera átøk, so fleiri fólk brúka bussleiðina. Tað hevði minkað um trupulleikan við vantandi parkeringsplássum.

**Átak:** Endurskoða ferðaætlanina hjá bussleiðini við jøvnum millumbilum og tryggja, at hon hóskar til arbeiðstíðir og skúlagongd.

**Ábyrgd:** Kommunan.

**Átak:** Fáa fleiri fólk at brúka buss í staðin fyri egnan bil.

**Ábyrgd:** Kommunan.

104 Lógasavn (logir.fo)

## 19.4

## Havnin – lærlinga- og lestrarbýur

Tað er umráðandi fyri Tórshavnar kommunu, at ung og lesandi støðast í høvuðsstaðnum. Lesandi seta í dag sín ríka dám á størru býirnar í okkara grannalondum, og Tórshavnar kommuna er í kapping við hesar býir og hesi økir úti í heimi um okkara unga tilfeingi. Eitt ríkt lestrarumhvørvi hevur eisini jaligar avleiðingar fyri eitt nú tænastuvinnuna í kommununi. Tískil eigur Tórshavnar kommuna at stuðla undir eitt stimbrandi og mennandi lestrarumhvørvi. Eitt spennandi lestrarumhvørvi økir eisini um áhugan at útbúgva seg, ið er neyðugt, um vit í framtíðini skulu standa okkum í kappingini um fólkfeingi.

Í visjónini og virðisgrundarlagnum hjá Tórshavnar kommunu stendur: „Vit vilja, at høvuðsstaðurin er virkin við nýggjum og mennandi útbúgvingartilboðum og dygdargóðum altjóða granskingarumhvørvi“[105]

### 19.4.1 Lærlinga- og lestrarbústaðir

Sum høvuðsstaður hevur Tórshavnar kommuna tann fyrimun, at meginparturin av útbúgvingarstovnunum eru í kommununi. Men samstundis leggur hetta eisini stóra ábyrgd á kommununa, m.a. at tryggja, at bústaðir eru til lærlingar og lesandi. Sum er, eru ov fáir lestrarbústaðir. Hetta kann forða fólki í at fáa sær útbúgving, og tað kann eisini vera ein orsøk til, at ungfólk fara av landinum at fáa sær útbúgving. Fólkavøkstur og arbeiðsmegi gagna vinnulívinum. Tí eiga bæði land, kommuna og vinna at vera áhugaði í, at lærlingar og lesandi fáa okkurt at búgva í.

Kommunan og landið eiga at skipa fyri, at lærlingar og lesandi fáa bústað, meðan tey útbúgva seg. Kommunan eigur at ganga undan, har lestraríbúðir kunnu byggjast, men samstundis skal kommunan seta krøv um, at talan er um fíggjarliga skynsama bygging, so lesandi hava ráð at rinda leigu. Men landið og vinnan eiga eisini at taka ábyrgd. Landið eigur at samstarva við kommununa um fleiri lestrarbústaðir gjøgnum t.d. Bústaðir.

Vinnan eigur eisini at vera partur av hesum, og tí eigur kommunan, tá hon selur stykkir til bústaðarbygging, at seta treytir fyri útstykkingar, so at ávíst tal av íbúðum verður markað til lestrarbústaðir.

Tórshavnar kommuna eigur eisini at hava sum mál, at Havnin skal vera ein altjóða lestrarbýur við einum lestrarumhvørvi, sum dregur útlendsk lesandi til sín, ið aftur skapa lív, altjóða dám og íblástur.

105 Visjón og virðisgrundarlag – Tórshavnar kommuna (torshavn.fo)

**Átak:** Fleiri lærlinga- og lestrarbústaðir skulu fáast til vega beinanvegin. Saman eiga landið og kommunan at tryggja, at nóg mikið av lestrarbústøðum eru, t.d. gjøgnum Bústaðir.

**Ábyrgd:** Landið, kommunan og vinnan.

**Átak:** Kommunan eigur at vísa á økir, har lestrarbústaðir kunnu byggjast.

**Ábyrgd:** Kommunan, landið og vinnan.

**Átak:** Tá lendi verður selt til bústaðarbygging, eigur kommunan – í ávísum førum – at áseta eitt ávíst tal av bústøðunum til lestrarbústaðir.

**Ábyrgd:** Landið, kommunan og vinnan.

### 19.4.2 Tryggja skikkaða arbeiðsmegi

Fólk við røttum førleikum eru avgerandi fyri, at vinnan mennir seg. Men fólk við røttum førleikum eru eisini umráðandi fyri, at samfelagið mennir seg. Tað er bæði galdandi fyri yrkislærd og fólk við hægri útbúgving.



Útbúgvingarmál er ábyrgd hjá landinum, og vinnan, landið og kommunan hava lærlingar og/ella lesandi í starvsvenjing. Tí eiga partarnir at kenna felags ábyrgd av at tryggja skikkaða arbeiðsmegi í framtíðini.

**19.4.3 Lærlingar.** Yrkislærd av ymsum slag eru fyritreyt fyri virkseminum hjá vinnuni. Í grannalondum okkara síggja vit, at tørvur er á lærlingum.[106] [107] Í Føroyum vísa tølini, at áhugin at læra er vaksandi. Tí er av alstórum týdningi, at land, kommuna og vinna tryggja hesa tilgongd, so vinnan í framtíðini fær starvsfólk við røttu førleikunum.

Landið og kommunan hava stóra ábyrgd, tá ið gongur minni væl hjá vinnuni, tí landið og kommunan hava støðugari fíggjarkarmar enn vinnan og hava tí møguleika fyri at taka lærlingar, hóast lágkonjunkturur er í samfelagnum. Virksemið hjá kommununi fevnir so breitt, at kommunan kann taka lærlingar í nærum øllum vinnugreinum.

**Átak:** Tryggja støðuga tilgongd av lærlingum.

**Ábyrgd:** Kommunan og landið.

106 For få unge vælger en erhvervsuddannelse efter grundskolen – DI (danskindustri.dk)
107 NHO bedriftene trenger flere med yrkesfaglig utdanning NHOs kompetansebarometer

**19.4.4 Hægri útbúgvingar.** Partar av vinnulívinum krevja starvsfólk við serstøkum førleikum. Hetta er m.a. fyritøkur, ið arbeiða innan fyri t.d. kt og ráðgeving av ymsum slag.

Samstundis er umráðandi, at Fróðskaparsetrið hevur støðuga fíggjarliga orku at útbúgva fólk við røttu førleikunum til vinnuna.

Kommunan eigur eisini at bjóða lesandi samstarv, so tey kunnu hava lestrarpláss hjá kommununi nakrar tímar um vikuna í eitt tíðarskeið í sambandi við lesturin.

**Átak:** Kommunan má skunda undir, at landið tryggjar Setrinum fíggjarligar karmar, so vinnan fær skikkaða arbeiðsmegi.
**Ábyrgd:** Kommunan og landið.

**Átak:** Kommunan skal hava tætt samband við lesandi og bjóða praktikkpláss og lestrarstørv í sambandi við lesnaðin.
**Ábyrgd:** Kommunan.



## 19.5 Átak

### Grøn kommuna, grøn vinna

Landið, kommunan og vinnan hava eina stóra felags ábyrgd, tá ið tað ræður um náttúru og burðardygd. Samstundis, sum vinnan má sleppa at menna seg, má fyrilit vera havt fyri náttúru og umhvørvi. Í visjón og virðisgrundarlagnum, sigur kommunan: „Vit vilja, at høvuðsstaðurin er burðardyggur búskaparliga, sosialt og umhvørvisliga[108]

Men ætlar kommunan, at okkurt skal henda á grøna økinum, er umráðandi, at hon gongur á odda og sjálv setur sær grøn mál. Tó skal havast í huga, at tað eisini snýr seg um skilagóða nýtslu. Tí tað snýr seg ikki bara um at skifta út fyri at gerast grønur. Skynsom fíggjarstýring og ábyrgdarfull nýtsla av náttúrutilfeinginum er eisini at skifta út, tá ið tørvur er á tí, soleiðis at tingini verða gagnnýtt sum best. Tí snýr tað seg eisini um at vera umhugsin, tá, ella áðrenn, amboð ella annað verða skift út. Hugsað eigur at verða um, hvørt tað er neyðugt at skifta út, og hví tað er neyðugt, og um tað eru fleiri fyrimunir ella vansar við at skifta út o.s.fr.

Fleiri fyritøkur hava gjørt grøn átøk, aðrar eru á veg, og uppaftur aðrar ikki hava tikið stig enn. Í fleiri førum eru tað viðskiftafólk ella

108 Visjón og virðisgrundarlag – Tórshavnar kommuna (torshavn.fo)

samstarvsfelagar, ið seta krøv um burðardygd og grønan politikk. Rákið í løtuni er, at vinnulív og kommunur leggja á grønari leið. Ætlar Tórshavnar kommuna somu leið, má kommunan seta sær sjálvari somu krøv, sum hon setur vinnulívinum. Umráðandi er tó, at vinnulívið fær eina skiftistíð at tillaga seg til grønu krøvini.

Í grannalondum okkara hava kommunur grunnar, har fyritøkur og felagsskapir kunnu søkja um stuðul til grøna umlegging, burðardygd v.m. Eitt nú hevur Tromsø kommuna eitt átak, ið tey kalla *Et bærekraftig Tromsø* i 2032.[109]

**19.5.1 Skiljing av ruski.** Krøvini til vinnuna frá viðskiftafólki og samstarvsfeløgunum gerast størri við atliti at mataroyðsli, skiljing av ruski, endurnýtslu v.m. Vinnan vísir á, at tað er ein avbjóðing, at ruskið ikki kann skiljast betur, tí viðskiftafólk seta krøv um hetta, um ein fyritøka skal lúka treytir fyri at gerast grøn fyritøka. Hetta er serstakliga galdandi fyri gistingarhús.

Matleivdir verða ikki skildar, tí myndugleikarnir meta, at vandin fyri, at ridluskriði spjaðir seg, er ov stórur. Hinvegin eru kommunan og partur av vinnuni við í royndarætlan saman við biogassverkinum Førka um at endurnýta leivdir av t.d. grønmeti og frukt. Henda

109 Fremtids- og næringsfondet | Tromsø kommune (tromso.kommune.no)



royndarætlan hevur hepnast so væl, at hon varð sett í gildi 1. januar 2024.[110]

Men eisini, tá ið tað ræður um at skilja annað rusk, so sum byggitilfar og vinnutilfar, er neyðugt við fleiri møguleikum at skilja t.d. timbur og annað, sum væl kann endurnýtast. Tað hevði gagnað vinnu, kommunu, borgarum og harvið umhvørvinum. Hetta samsvarar eisini við umhvørvispolitikkin hjá kommununi, ið staðfestir, at: „Asfalt, betong og glas skal endurnýtast.“ [111]

**Átak:** Tórshavnar kommuna má gera eina ætlan fyri, nær og hvussu vinna og borgarar kunnu skilja ruskið betur. Hetta eigur at verða gjørt beinanvegin.

**Ábyrgd:** Kommunan.

**Átak:** Umstøðurnar á KOB mugu betrast, so til ber at skilja meira tilfar frá vinnuni og borgarum. Skiljihøll eigur at verða bygd, so timbur og annað byggitilfar kann skiljast og endurnýtast.

**Ábyrgd:** Kommunan og KOB.

110 Høvuðsstaðurin skal skilja meira burturkast | Kringvarp Føroya (kvf.fo)
111 Grøna Leiðin (2016)

**Átak:** Tórshavnar kommuna og landsmyndugleikarnir mugu finna eina loysn á, hvussu matleivdir verða skildar frá øðrum burturkasti.

**Ábyrgd:** Kommunan og landið.

### 19.5.2 Útstykkingar, landbúnaður og náttúra

Ein stórur partur av stykkjum til bústaðir og vinnu er í landbúnaðarøki, tað er jørð, ið upprunaliga er ætlað til landbúnað, t.v.s. at velta og annað. Landbúnaðurin hevur týdning í sambandi við at fáa matvørur, og lendið hevur týdning fyri at fólk fáa bústað. Men lendið hevur eisini týdning við atliti at náttúrmargfeldi so sum plantum, djóralívi og øðrum.

Í kommunuætlanini 2020 sigur kommunan: Ynskiligt er at varðveita og stuðla undir landbúnað í kommununi, og tí er velt lendi, sum tekniskt sæð er egnað til landbúnað, raðfest fyri seg. Endamálið er ikki at leggja hesi øki út til býarvøkstur í nærmastu framtíð, men einans at vísa á, at hesi lendini eru egnaði til býarvøkstur í framtíðini, til dømis um festini verða niðurløgd ella onnur viðurskifti gera, at økini ikki longur verða nýtt til landbúnað.[112]

Hugsandi er, at landbúnaður í framtíðini fer at fáa størri týdning sum vinna, tí ófriður úti í heimi hevur víst, at umráðandi er at vera

112 Kommunuætlan 2020



sjálvbjargin við mat. Tí eigur kommunan at hava eina greiðari støðu til landbúnað.

**Átak:** Ein kommunal lendisætlan verður gjørd, sum skipar økini landbúnaðarjørð, náttúru og útstykking.

**Ábyrgd:** Kommunan.

**Átak:** Kommunan má taka støðu til og hava greiðan politikk um náttúruvernd og landbúnaðarvinnuna við atliti at náttúrumargfeldi so sum plantum, djóralívi í mun til útstykking til bústaðar og vinnuendamál.

**Ábyrgd:** Kommunan.

**Átak:** Landið má gera eina lendisætlan.

**Ábyrgd:** Landið.

**19.5.3 Landstreymur:** Tórshavnar havn er største havn í Føroyum, og har er nógv virksemi. Tí eru nógv arbeiðspláss tongd at Tórshavnar havn og teimum fyritøkum, ið brúka havnina. Nógva virksemið ávirkar eisini grannar, ið vísa á, at teir verða órógvaðir av gangi.

Harumframt hevur Tórshavnar havn kannað møguleikarnar fyri landstreymi. Talan er um kostnaðarmikla íløgu, men nógv bendir á, at hetta er neyðug íløga, tí krøv um landstreym koma uttanífrá. ES hevur sett reglur í gildi um, at í 2030 skulu øll ferðafólkaskip og bingjuskip nýta landstreym í stórum havnum.[113] Um Tórshavnar havn verður mett at vera ein stór havn, er torført at siga, men við reglunum hjá ES fara fleiri skip, ið koma á Havnina, at vera før fyri at taka landstreym. Aðrastaðni fáa havnir ískoyti úr ES fyri at gera íløgu í landstreym.[114] Tí eiga bæði kommunupolitikarar og landspolitikarar at taka støðu til, um teir vilja hava landstreym, og um teir vilja rinda part av kostnaðinum fyri hetta. Landstreymur minkar um $CO_2$-útlát, og minkar eisini um gangin, sum órógvar grannarnar við havnarløgini.

Tórshavnar havn eigur at hugsa um grannalagið og eigur at virka fyri, at møguleiki er fyri umhvørvisvinarligum loysnum til allan flutning á økinum. Eisini eigur at vera skipað fyri, at egnar ognir á økinum virka við umhvørvisvinarligum orkuloysnum, t.d sjóhita, og har tað er møguligt eggja øðrum virkjum á økinum at gera tað sama, helst í felag. Landstreymur eigur at vera fingin til vega, har tað er møguligt, og um tað er tann mest umhvørvisvinarliga loysnin. Eisini eigur Tórshavnar havn at halda fram við at fríðka um økir og bygningar, ið havnin varðar av.

113 EU vedtager brændstofstandard for skibsfarten i EU: Et vigtigt skridt mod en klimaneutral skibsfart | sfs.dk (soefartsstyrelsen.dk)
114 Aarhus Havn har åbnet for landstrøm (jyllands-posten.dk)

**Átak:** Fyrireikingar eiga at verða gjørdar til landstreym.

**Ábyrgd:** Tórshavnar havn, kommunan og landið.

## 19.6. Átak

### Bústaðarpolitikkur og vinnupolitikkur

Bústaðarpolitikkur er ein avgerandi fyritreyt fyri góðum karmum hjá vinnulívinum, tí bústaðir eru ein treyt fyri, at vinnan fær arbeiðsmegi. Alsamt fleiri fólk búseta seg í Tórshavnar kommunu, og talið av húskjum er vaksið nógv. Tað sæst aftur á prísunum á bústøðum, sum eru hækkaðir rættuliga nógv seinastu árini. Hetta setur eisini krøv til kommunur um at útvega stykkir til bústaðarbygging.

Búskaparráðið vísir í heystfrágreiðingini 2023 á, at tørvur er á fleiri bústøðum, tí fólkatalið í Føroyum er vaksið so nógv. Sambært Búskaparráðnum kann tørvurin á bústøðum forða fyri fólka- og búskaparvøkstri komandi árini. „Búskaparráðið metir tað vera umráðandi at kommunur við stórum fólkavøkstri framskunda útstykkingar av grundstykkjum – serliga til bygging av smærri bústaðareindum, so bráðfeingistørvurin skjótari verður nøktaður, og at landið somuleiðis ger sítt íkast við at byggja leigubústaðir.“[115]

Vinnan vísir á, at tørvurin á bústøðum er ein stór avbjóðing, tá ið fyritøkur skulu hava nýggj starvsfólk.[116] Fáa fólk onki at búgva í, búseta

115 Frágreiðingar (landsbankin.fo)
116 Industry



tey seg í aðrari kommunu, og ein avleiðing kann vera, at vinnan ikki fær arbeiðsmegi, tí fólkini velja fyritøkur, ið eru nærri við bústaðin.

**Átak:** Fleiri bústaðir skulu fáast til vega.
**Ábyrgd:** Kommunan, landið og vinnan.

**Átak:** Endurskoða bústaðarpolitikkin hjá kommununi, sum er frá 2018.
**Ábyrgd:** Kommunan.

### 19.6.1. Vinnulív og grannalív

Ein fyritreyt fyri góðum grannalagi er, at vinnulív og grannalív trívast saman og hava fyrilit fyri hvørjum øðrum. Tað vil siga, at vinnulív ansar eftir, at grannar ikki hava ampa av gangi, lukti, ljósi og øðrum. Í ávísum førum eru vinnulív og bústaðareindir í sama øki ella í nánd av hvørjum øðrum, og tá eigur at verða arbeitt fyri, at bústaðarøkini ikki verða órógvaði av vinnulívinum.

**Átak:** Avmarkað árin av ljóði, lukti, ljósi, ferðslu og øðrum, ið kann órógva grannar.
**Ábyrgd:** Vinnan og kommunan.

**Átak:** Vinnan og kommunan eiga við jøvnum millumbilum at kanna árin, ið vinnulív hevur á grannar, og geva hesum gætur.

**Ábyrgd:** Vinnan og kommunan.



## 19. 7. Átak

### Integratión

Ongin integratiónslóg er í Føroyum, men integratión er málsøki hjá landinum. Hinvegin eru útlendingamál danskt málsøki, men tað eru fleiri fyriskipanir galdandi í Føroyum í sambandi við útlendska arbeiðsmegi.

Alsamt fleiri útlendingar koma til Føroya at arbeiða. Arbeiðsgevarin hevur ábyrgdina av útlendsku starvsfólkunum, og landið hevur ábyrgdina av lógini. Sostatt hevur kommunan onga lógarásetta skyldu. Men Tórshavnar kommuna hevur valt at arbeiða við integratión. Umframt at hava ein integratiónssamskipara verður skipað fyri skeiðum í føroyskum fyri útlendingar á Tórshavnar Kvøldskúla. Harumframt eru onnur tiltøk eisini fyri útlendingar, eitt nú fjølmentanarvikan. Fyritøkur hava eisini gjørt ymist fyri útlendsk starvsfólk, m.a. havt málskeið.[117] Størri fyritøkur hava í flestu førum orku til at taka sær av útlendskum starvsfólkum, men kommunan eigur eisini at kanna tørvin hjá smærri fyritøkum, hvussu kommunan kann hjálpa teirra starvsfólkum á t.d. málskeið á Kvøldskúlanum.

Hinvegin, so liggur størsta ábyrgdin hjá landinum, tí landið umsitur lógir og reglur um útlendingar, arbeiðsloyvi og uppihald. Tí eigur

117 Bjóðar starvsfólkum málskeið | Kringvarp Føroya (kvf.fo)

landið at taka ábyrgd, bæði fíggjarliga og við starvsfólkaorku, so útlendska arbeiðsmegin verður integrerað. Hetta kann gerast í samstarvi við kommunurnar, um so er. Men ivasamt er, um allar kommunur hava orku at lyfta hesa uppgávuna uttan hjálp frá landinum.

**Átak:** Kommunan eigur at halda fram við tí, ið longu verður gjørt.

**Ábyrgd:** Kommunan.

**Átak:** Landið má taka størri ábyrgd av integratión og hjálpa kommunum á hesum økjum, t.d. fíggjarliga.

**Ábyrgd:** Landið.





# 20 Kostnaður fyri at seta átøkini í verk, meting av ábyrgdarbýtinum, tíðarætlan fyri átøkini

| Átak | Ábyrgd | Kostnaður | 2024 | 2025 | 2026 | 2027 | 2028 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Vinnuskiva Vinnulívið skal hava *eina* hurð inn í kommununa, so fyrispurningar og mál verða avgreidd skjótt | TK | Finnast á verandi játtan | × | | | | |
| Støðug, rættstundis og dagførd kunning má alla tíð vera frá kommununi um tiltøk, ið ávirka vinnuna. Kommunan skal eisini áleggja fyrireikarum av tiltøkum at bera kunningina víðari. | TK | Finnast á verandi játtan | | × | | | |
| Vinnuforum er eitt vælumtókt árligt tiltak, tað eigur at halda fram og verða styrkt – kanska við einum minni vinnuforum, tá ið tørvur er á tí. | TK Hugskotið | | | | 200.000 | | |
| Heimleiðisfundir av og á, har vinnan fær kunning og/ella prát | TK | Finnast á verandi játtan | | × | | | |

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Kommunan eigur at hava eina innovatións-eind og eigur at hava samstarv við lærlingar/lesandi, íverksetarar og onnur um nýhugsan og menning | TK | Verður ásett, tá hetta er kannað nærri | | | × | | |
| Nýhugsan eigur at vera, tá tað ræður um mannagongdir og annað, so mál og annað verða avgreidd uppaftur betur og skjótari enn í dag. Á henda hátt hevði borið til at ment kommununa, t.d. við at seta í verk skipanir, ið lætta um avgreiðslu av borgarum, og skipanir, sum menna vitanardeiling í kommununi. | TK | Finnast á verandi játtan | × | | | | |
| Játtanin til Hugskotið eigur at verða økt. Hugskotið eigur framhaldandi at hava staðseting saman við vinnuframapørtunum Sjóvinnuhúsinum, Filmshúsinum, Vinnuframa, Framtaki og Fróðskaparsetrinum. | TK | 800.000 kr. tilsamans komandi árini | | 200.000 | 200.000 | 200.000 | 200.000 |
| Kommunan eigur at stuðla ætlanunum um ein depil, sum kann verða savningarstað fyri granskarar, nýskaparar, vinnu, íverksetarar, íleggjarar og lesandi/lærlingar. | Landið, TK | Verður ásett, tá landið hevur tikið støðu. | | × | | | |
| Skattafrádráttur eigur at vera til serfrøðingar í eitt ávíst tíðarskeið, t.d. eitt ár ella fyrsta árið, ið serfrøðingarnir eru í Føroyum. | Landið, TK | Verður ásett, tá landið hevur tikið støðu. | | | | | |
| Fyritøkur eiga at fáa skattafrádrátt fyri íløgur í gransking og menning í eitt ávíst tíðarskeið t.d. fyrsta árið, ið granskað verður. | Landið, TK | Verður ásett, tá landið hevur tikið støðu. | | | | | |



| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Kommunan skal tryggja, at vinnustykkir eru tøk, og at stykkini nøkta tørvin, ið vinnan hevur. Vinnustykkir skulu vera tøk í øllum bygdum og býum í kommununi. | TK | | | | × | | |
| Nýhugsan eigur at vera viðvíkjandi vinnuøkjum, so hesi hóska til tørvin hjá vinnuni. Kommunan skal virka fyri, at vinnuøkir og grannaløg fáa felags gagn av parkerings-plássum, orkuskip-anum og øðrum. | TK, vinnan | | × | | | | |
| Kommunan eigur at áleggja fyritøkum at halda økini rundan um hjá sær sjálvum, so hesi eru ruddilig og ikki til ampa fyri grannafyritøkur og bústaðarøkir. | TK, vinnan | | × | | | | |
| Seta í verk tiltøkini, sum mælt verður til í parkeringspolitikkinum hjá Tórshavnar kommunu. | TK. | | × | | | | |
| Endurskoða ferða-ætlanina hjá bussleiðini við jøvnum millum-bilum og tryggja, at hon hóskar til arbeiðs-tíðir og skúlagongd. | TK | | × | | | | |
| Fáa fleiri fólk at brúka bussin í staðin fyri egnan bil. | TK | | × | | | | |
| Fleiri lærlinga- og lestrarbústaðir skulu fáast til vega. Landið og kommunan eiga í felag at tryggja, at nóg mikið av lestrarbústøðum eru, t.d. gjøgnum Bústaðir. | TK, landið | | × | | | | |
| Kommunan eigur at vísa á økir, har lestrarbústaðir kunnu byggjast. | TK, vinnan | | × | | | | |

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tá lendið verður selt til Bústaðarbygging, eigur kommunan í ávísum førum at áseta eitt ávíst tal av bústøðunum til lestrarbústaðir. | TK, vinnan | | | × | | | |
| Tryggja støðuga til-gongd av lærlingum | TK, vinnan | | | | × | | |
| Kommunan má skunda undir, at landið tryggjar Setrinum fíggjarligar karmar, so vinnan fær skikkaða akademiska arbeiðs-megi. | TK, vinnan | | × | | | | |
| Kommunan skal hava tætt samband við lesandi og bjóða praktikkpláss og lestrarstørv í sambandi við lesnaðin. | TK, landið | | × | | | | |
| Tórshavnar kommuna má gera eina ætlan fyri, nær og hvussu vinna og borgarar skulu kunnu skilja ruskið betur. Hetta eigur at verða gjørt beinanvegin. | TK, landið | | × | | | | |
| Umstøðurnar á KOB mugu betrast, so til ber at skilja nýtiligt tilfar tilfar frá vinnuni og borgarum. Skiljihøll eigur at verða bygd, so timbur og annað byggitilfar kann skiljast og endurnýtast. | TK, landið | | × | | | | |
| Tórshavnar kommuna og lands-myndugleikarnir mugu finna eina loysn á málinum um, hvussu matleivdir skulu skiljast. | TK | | × | | | | |
| Kommunan má taka støðu til náttúruvernd og landbúnaðarvinnu viðvíkjandi útstykking og vinnuendamáli og hava greiðan politikk um hesi viðurskifti | TK, KOB | | | × | × | × | × |
| Landið má gera eina lendisætlan. | TK, landið | | × | | | | |
| Fyrireikingar eiga at verða gjørdar til landstreym. | TK | Veldst um loysnina | × | | | | |
| Fleiri bústaðir skulu fáast til vega. | Landið | | × | | | | |
| Endurskoða bústaðarpolitikkin hjá kommununi, sum er frá 2018 | TK, Tórshavnar havn, landið | | × | | | | |
| Avmarka árin av ljóði, lukti, ljósi, ferðslu og øðrum, ið kann órógva grannar. | TK, landið og vinnan | | × | | | | |
| Vinnan og kommunan eiga við jøvnum millum-bilum at kanna árin, ið vinnulív hevur á grannar. | TK | | × | | | | |
| Integratión. Kommuna eigur at halda fram við tí, ið longu verður gjørt. | TK, vinnan | | × | | | | |
| Landið má taka størri ábyrgd av integratión og hjálpa kommunum á hesum øki, t.d. fíggjarliga. | TK, landið | | × | | | | |

torshavn.fo